2. MAI 2018



# BÚSKETTGREINING OG FÍGGJARLIG STÝRING AV FRÓÐSKAPARSETRINUM

# Innihaldsyvirlit

Arbeiðssetningur og manning ... 5
Samanumtøka og niðurstøða ... 6
Avmarking ... 7
Trupulleiki ... 8
Endamálið við arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum ... 8
Búskaparlig hugtøk, sum hava týdning fyri hesa viðgerðina ... 8
Greining av búskaparligu gongdini á Setrinum frá 2008/2013 ... 10
Búskaparliga gongdin á Setrinum seinastu árini ... 10
Samanbering av kostnaði av universitetsvirksemi í Føroyum, Danmark og Grønlandi ... 17
Kostnaðurin av einum studentaársverki á Setrinum ... 18
Kostnaðurin av einum studentaársverki á universitetinum í Grønlandi (Ilisimatusarfik) ... 18
Kostnaðurin av einum studentaársverki á donskum universitetum ... 19
Niðurstøða fyri samanburð ... 19
Ráðleggingarmyndil Setursins ... 20
Endamálið við myndlinum ... 20
Modellering í mun til output ... 20
Hvat triggar framleiðslufaktorarnar lønir og rakstur á Setrinum ... 21
Lønir til undirvísing og gransking ... 21
Lønir til stuðulsfunktiónir ... 22
Keyp av vørum og tænastum ... 22
Húsaleiga, el og hiti ... 22
Samanhangurin frá játtan til kandidat ... 22
IV: Framleiðslur (output) ... 23
Hvat kosta framleiðslurnar? ... 23
Hvussu nógv verður framleitt? ... 24
III: Framleiðslusløg (útbúgvingar) ... 24
Slag av útbúgvingum: ... 25
Gransking ... 25
II: Framleiðslutilgongd: ... 26
Alment: ... 26
Undirvísing ... 26

Gransking....29
I: Játtan og tilfeingi....29
Lønir til undirvísing og gransking....30
Arbeiðstíð til stuðulsfunktionir....30
Vørur og tænastur....31
Húsaútreiðslur....31
Hvussu kann myndilin verða brúktur í dialoginum við Mentamálaráðið....31
Hvussu kann myndilin verða brúktur á Setrinum....32
Uppfylging í mun til ætlan....33
Frágreiðing til myndilin....35
Fíggjarstýring og játtanarviðurskifti....39
Fíggjarlógartilgongd....39
Samarbeiðið millum ráðið og Setrið er merkt av strongd....39
Vøksturin ikki nóg væl kjølfestur í politisku skipanini....40
Góðkenning av nýggjum virksemi....40
Brúk av ætlanarárunum....40
Tað verður brúkt nógv orka upp á játtanartilgongdina....41
Vantandi standardisering í játtanararbeiðinum....41
Eitt sindur ivingarsamt hvat ráðið og Setrið leggja í játtanargóðkenningina....42
Endaúrslitið av fíggjarárinum 2017....42
Vantandi upplýsingar um virksemið hjá Setrinum á fíggjarlógini....43
Innanvirkis fíggjarstýring á Setrinum....44
Hvussu verður arbeitt internt við fíggjarlógaruppskot....44
Hvussu verður fíggjarlógin verksett á stovninum....44
Próvbókin....45
Reglur o.t. fyri arbeiðstíð....46
Skráseting av arbeiðstíð....47
Innaneftirlit....48
Fíggjarstýring og myndilin....48
**Greining av muni millum hagtøl hjá Studna og Fróðskaparsetrinum**....49
Samanbering millum tøl frá Studna og Fróðskaparsetrinum....49
Lesandi, sum fáa studning, men sum IKKI standa at vera virkin í Próvbók....49
Hvørjar útbúgvingar geva rætt til stuðul?....50
Hvat nú?....53

Fylgiskjal 1 Arbeiðssetningur

Fylgiskjal 2 Ráðleggingarmyndil Setursins við dátum fyri 2017

Fylgiskjal 3 Samskifti millum ráðið og Setrið um játtanina fyri 2017

Fylgiskjal 4 Arbeiðið við fíggjarlóg í Mentmálaráðnum

Fylgiskjal 5 Uppskot til Normering av undirvísingararbeiði á Fróðskaparsetri Føroya

# Arbeiðssetningur og manning

Mentamálaráðið og Stýrið fyri Fróðskaparsetrið settu í mars ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk at arbeiða við evninum, sum varð kallað Búskettering og fíggjarlig stýring av Fróðskaparsetrinum .

Uppgávan var

1. At greina búskapargongdina hjá Setrinum yvir tíð og møguliga samanbera búskaparstøðuna við onnur universitet.
2. At greina, hvussu fíggjarstýringin er løgd til rættis og møguliga at mæla til ábøtur.
3. At mæla til ein fíggjarstýringarmyndil, sum kann verða brúktur at modellera virksemið.
4. At greina, hví munur er á talinum av teimum, sum standa at fáa útbúgvingarstuðul í skipanini hjá Studna og talinum av teimum, sum standa skrásett at vera lestrarvirkin á Setrinum.

Arbeiðið við hesum evnum strekti seg yvir tveir mánaðir.

Neyvari arbeiðssetningur er viðlagdur sum fylgiskjal A.

Limirnir í arbeiðsbólkinum eru:

Leif Abrahamsen, formaður í arbeiðsbólkinum

Sigurð í Jákupsstovu, rektari, Fróðskaparsetur Føroya

Mortan Zachariassen, fulltrúi, Mentamálaráðið

Oystein Sørensen, fulltrúi, Mentamálaráðið

Hugin Skaalum, fíggjarleiðari, Fróðskaparsetur Føroya

Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri, Fróðskaparsetur Føroya

Hans Kári Vang, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið

Í stýrisbólkinum sita:

Poul Geert Hansen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum

Bjarni Bjarnason, aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum

Ólavur Ellefsen, formaður í Stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya

## Samanumtøka og niðurstøða

**Gongdin í virkseminum:** Virksemið á Setrinum er vaksið nógv seinastu árini. Leiðslan á Setrinum hevur lagt dent á at fáa nýggjar útbúgvingar og fleiri lesandi. Hetta hevur eydnast. Talið á lesandi á Setrinum síðan 2012 er vaksið við 400, og er í dag umleið túsund. Hetta er ein jalig gongd, at vit hava fingið so nógv fleiri ung menniskju at støðast í Føroyum, sum ríka okkara samfelag á so mangan hátt.

Hóast Setrið hevur lagt dent á at effektivisera og umskipa raksturin, sær tað út til, at leiðslan hevur raðfest undirvísing og gransking meira enn lønir til stuðulsfunktiónir og til annan rakstur.

Tí kann tað gerast neyðugt at fáa eina betri javnvág í hesi viðurskifti framyvir.

Ein samanbering millum universitetið í Grønlandi og universitet í Danmark vísir, at kostnaðurin av einum ein miðalstudentaársverki á Setrinum er nakað hægri enn kostnaðurin av einum miðal studentaársverki á donskum universitetum og nógv lægri enn miðalkostnaðurin á universitetinum í Grønlandi.

**Myndil:** Tað er gjørdur ein ráðleggingarmyndil, sum hevur fingið heitið Ráðleggingarmyndil Setursins, sum greinar samanhangin millum input til Setrið, sum er játtan á fíggjarlógini, og output frá Setrinum, sum er studentaársverk og granskingarúrslit.

Tað, sum skapar útreiðslurnar á Setrinum, er ikki talið av næmingum, men talið av skeiðum, sum verða bjóðað út. Hetta er eisini tað heilt sentrala í myndlinum. Myndilin er einfaldur og sigur, at fyri hvønn tíma, sum verður lisin á t.d. masterskeiði, fær deildin 6 tímar at ráða yvir til undirvísingarvirksemið. Krevur eitt skeið, at tað skulu verða lisnir 50 tímar, fær deildin 300 tímar at ráða yvir til at halda alt neyðugt virksemi.

Ætlanin við myndlinum er at brúka hann til ymisk endamál, t.d. til samskifti við ráðið, til what if-greiningar og sum grundarlag undir miðfirring av ráðleggingini úti á deildunum á Setrinum.

Tann mest avgerandi fyritreytin fyri eini góðari móttøku av einum myndli av hesum slagnum er, at organisatiónin tekur myndilin til sín og partvíst tillagar arbeiði og raðfestingar eftir tankagongdini í myndlinum. Báðar hesar fyritreytirnar eru uppfyltar í hesum arbeiðinum. Fyrst og fremst tí deildirnar á Setrinum eru jaligar fyri tankunum aftanfyri ráðleggingarmyndilin, tí leiðslan á Setrinum ynskir eitt amboð, og tí ráðið ynskir størri gjøgnumskygni í virksemið á Setrinum.

**Fíggjarstýring:** Orsøkin til hesa greining er m.a. ónøgd hjá Mentamálaráðnum um fíggjarligu stýringina, og at játtanin ikki heldur. Játtanin til Setrið er ein av teimum stóru rakstrarjáttanunum og ein tann játtanin, sum er vaksin mest á fíggjarlógini seinastu árini.

Hesin vøksturin hevur skapt spenningar millum ráðið og Setrið, tí Setrið hevur viljað meira, enn hvat ráðið hevur kunnað skapt av játtan. Tað er ein beinhørð útreiðslustýring á fíggjarlógini, tí hevur tað verið ein politisk avbjóðing hjá ráðnum at vaksa um játtanina.

Tað eru nú okkurt um túsund lesandi á Setrinum. Setrið hevur ein málsetning um, at tað skulu vera 1500[1] lesandi á Setrinum í 2024. Hetta við m.a. at bjóða fleiri útbúgvingar. Tað merkir, at játtanin til Setrið skal vaksa nógv meira fyri at náa hesum setningi.

Tað er eingin greið avtalað virksemisætlan millum ráðið og Setrið fyri komandi árini og harvið eingin avleidd rakstraræltan fyri komandi árini. T.d. sæst einki um setning Setursins í ætlanartølunum á fíggjarlógini.

Tað er neyðugt at talseta ein komandi vøkstur og at fáa størri politiskt kjølfesti fyri einum slíkum vøkstri, tí annars slepst neyvan úr tí naggatódn, sum ráðið upplivir í løtuni.

Tað er neyðugt, at tað verður álit aftur millum partarnar. Ein av fyritreytunum er gjøgnumskygni viðvíkjandi, hvussu peningurin verður brúktur, og hvat fæst fyri peningin. Tað eru serliga tvey amboð, sum skulu stuðla uppundir hetta; tey eru komandi ráðleggingarmyndilin og Próvbókin, sum heldur skil á lestrarvirkseminum á Setrinum.

Mælt verður til:

- skipan av einum virknum innaneftirliti, sum m.a. eisini fevnir um Próvbókina
- at tað verða fleiri virksemisupplýsingarnar á fíggjarlógini
- at arbeiðsviðurskiftini verða skipaði so, at krøvini í roknskaparkunngerðini verða uppfylt

**Munur millum Studna og Próvbókina:** Ein av uppgávunum var at greina, hví tað var munur á talinum av teimum, sum fingu lestrarstuðul, og teimum, sum standa at vera lestrarvirkin á Setrinum. Greiningin vísti, at munurin er størri enn hildið. Munurin millum skipanirnar er umleið 40%. Orsøkin er ikki feilir, men ymiskar meginreglur fyri at stuðla uppundir teir ymisku leiklutirnar, sum Studni og Setrið nú einaferð eru sett í verðina fyri at greiða. Knappur helmingur av muninum stavar frá útbúgvingum, sum ikki geva rætt til stuðul. Restin er støður hjá fólki sum t.d. barnsburðarfarloyvi, ov høg inntøka og vantandi lestrarvirkni.

## Avmarking

Uppgávan fevnir ikki um at taka støðu til, hvussu granskingarparturin skal verða stýrdur og máldur.

Talan er ikki um eina eina grannskoðan, t.e. at farið er ikki niður í bøkurnar at hyggja eftir tingunum.

[1] Í strategiskjalinum á heimasíðuni hjá Setrinum (Fróðskaparsetur Føroya – mál og mið (2014 – 2024)) stendur, at í 2024 skal Fróðskaparsetrið hava í minsta lagi 1500 lesandi. Miðað verður ímóti at bjóða fleiri granskingargrundaðar útbúgvingar á altjóða stigi til ein breiðan skara, so at fleiri fáa møguleikan at nema sær hægri útbúgving.

Uppgávan snýr seg ikki um eina støðutakan, hvørt tað er rætt at hava eitt universitet í Føroyum, ella hvørjar útbúgvingar skulu bjóðast ella ikki bjóðast.

## Trupulleiki

**Stýring:** Stóri trupulleikin sambært Mentamálaráðnum er, at torført hevur verið at halda játtanina hjá Fróðskaparsetrinum, og at eykajáttan hevur verið neyðug í fleiri umførum.

**Gjøgnumskygni:** Mentamálaráðið sigur beinleiðis, at tað ofta hevur verið trupult hjá Mentamálaráðnum at fáa neyðuga innlitið í virksemið á Setrinum fyri at svara spurningum, sum politiska skipanin hevur sett.

Júst hesir báðir spurningarnir – fíggjarstýring og gjøgnumskygni - hava ligið sera frammarlaga í hesum arbeiðnum og í teimum loysnum, sum mælt verður til at seta í verk.

## Endamálið við arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum

Viðurskiftini, sum verða viðgjørd, hava til endamáls at gera tingini betri og at koma við konstruktivum uppskotum. Fyri at lýsa, hvussu tingini kunnu gerast betri, hava vit sjálvandi verið noydd at hyggja eftir, hvussu tingini virka í dag. Tað hevur ongantíð verið ein spurningur um at plasera ábyrgd, tí tað halda vit ikki liggur í orðingini av arbeiðssetninginum.

Alment kunnu vit siga, at øll arbeiða ábyrgdarfult, og at tað eru nógv dugnalig fólk í skipanini. Tó eru fleiri systemiskir trupulleikar, sum fleiri lættliga kunnu verða loystir.

## Búskaparlig hugtøk, sum hava týdning fyri hesa viðgerðina

Fyri at betra um fíggjarstýringina og skapa álit á almenna geiran, hevur almenna fyrisitingin lagt stóran dent á viðurskifti nevnd niðanfyri.

Hesi atlit eru millum annað grundarlagið undir hesi viðgerðini.

Fíggjarstýring:

- At stovnurin brúkar amboðini í Búskaparskipan landsins
- At roknskaparhaldið er skipað á tryggan hátt og kann stuðla uppundir innanhýsis fíggjarstýringini
- At tað er sett í verk búskettstýring
- At tað er ein skynsom fíggjarstýring, at tað verður fokuserað upp á produktivitet, effektivitet og sparsemi
- At tað er ein tættur dialogur um fíggjarviðurskifti við ráðið
- At tað er eitt virkið innaneftirlit á stovninum av øllum týdningarmiklum viðurskiftum
- At stovnurin hevur álítandi tøl fyri framleiðslu

Gjøgnumskygni: At tað, sum kann vera alment á roknskaparøkinum, eisini er alment, t.d. roknskaparskjøl, lønarviðurskifti og avtalur. At stovnurin kunngerð framleiðsluna, og at fólk uttan hóvasták kunnu fáa upplýsingar um hesa og onnur týdningarmikil viðurskifti.

Samanbari: At tað ber til at samanbera gongdina yvir ár og at uppgerðarmeginreglur ikki verða broyttar, so tað verður torført at samanbera.

At kritiskar kt-skipanir eru væl tryggjaðar, t.d. skipanir við próvtalsupplýsingum.

# Greining av búskaparligu gongdini á Setrinum frá 2008/2013

## Búskaparliga gongdin á Setrinum seinastu árini




| | Roknskapur 2013 | Roknskapur 2014 | Roknskapur 2015 | Roknskapur 2016 | Roknskapur 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fyristingarligir stovnar | 44% | 43% | 44% | 40% | 37% |
| Glasir og Vinnuskúlin | 15% | 17% | 19% | 19% | 14% |
| Heilsustovnar | 42% | 44% | 49% | 48% | 50% |
| Handil og vinna | 45% | 44% | 47% | 43% | 39% |
| Fiskivinna | 41% | 35% | 42% | 40% | 34% |
| Setrið | 20% | 19% | 19% | 19% | 15% |

*Mynd 1. Lutfall millum løn og ávísar rakstrarkontur fyri útvaldar sektorar og stovnar (Kelda: Leiðslukunningarskipanin)*

Í Mynd 1 omanfyri eru standardkontur 14 og 15 settar í mun til lønir fyri útvaldar sektorar og stovnar. Útreiðslur til orku (stkt 1441 og stkt 1442) og standardkonta 16 eru ikki tiknar við fyri at gera tølini meira samanbærilig. Fleiri stovnar búgva nevniliga ókeypis, meðan aðrir brúka munandi part av játtanini til húsaútreiðslur. Hetta er órógvandi fyri ein samanburð.

Tað, at lutfallið millum rakstur og løn minkar, er ofta eitt úttrykk fyri, at stovnarnir ikki tilpassa lønarútreiðslurnar til játtanina. Fíggjarmálaráðið hevur skorið niður í játtanini upp á aðrar rakstrarútreiðslur seinastu árini, og hevur kompenserað fyri vøksturin í lønarsáttmálunum. Ein av grundgevingunum fyri niðurskurðinum upp á aðrar rakstrarútreiðslur er eitt eitt úttrykk fyri, at stovnarnir eru og verða meira effektivir. Myndin vísir greitt, at hetta “effektivitetsynski” gongur mest útyvir raksturin.

Ein búskaparliga sunnur stovnur hevur eitt meira stabilt lutfall yvir tíð.

Vit hava sæð áður, har lutfallið minkar ár undan ári, at stovnarnir ikki hava pláss til endurnýggjan og til effektiviseringsátøk, t.d. á KT-økinum. Tí vera stovnarnir fyrr ella seinni noyddir at síggja henda veruleika í eyguni og javna hesi viðurskifti, antin við at lækka lønarútreiðslurnar, ella við at stovnurin fær eina meirjáttan. Tó kann viðmerkjast, at rektarin hevur upplýst, at Fróðskaparsetrið hevur effektiviserað og endurnýggjað KT-økið munandi.

Mynd 1 vísir eitt minkandi lutfall á øllum økjum uttan á heilsuøkinum. Hetta er ikki bara eitt ringt tekin fyri Setrið, men eitt alment ringt tekin.




| | Roknskapur 2008 | Roknskapur 2009 | Roknskapur 2010 | Roknskapur 2011 | Roknskapur 2012 | Roknskapur 2013 | Roknskapur 2014 | Roknskapur 2015 | Roknskapur 2016 | Roknskapur 2017 | Játtan 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | |
| løn | 45.240 | 53.015 | 55.158 | 54.921 | 59.924 | 60.639 | 65.307 | 67.919 | 76.844 | 81.826 | 79.974 |
| Rakstur | 15.493 | 13.299 | 16.180 | 15.970 | 15.111 | 15.289 | 15.051 | 15.498 | 17.360 | 14.866 | 14.700 |

*Mynd 2. Bruttoútreiðslur fyri Setrið liðaðar á lønir og aðrar útreiðslur tíðarskeiðið 2008-2018 (Kelda: Leiðslukunningarskipanin)*

Bæði "Setrið" og "Glasir og Vinnuháskúlin" hava eina skeiva gongd seinnu árini. Setrið er nokk verri fyri enn Glasir, tí Glasir framyvir verður á eini staðseting og hevur nógva nýggja útgerð, sum verður fíggjað yvir løgukontuna.

Setrið hevur eisini tað avbjóðingina, at tað er tørvur á nógvari uttanlandsferðing, um granskararnir skulu kunna luttaka í viðkomandi netverkum.

**Skal Setrið – og fleiri stovnar við Setrinum - ikki koma illa fyri seinni, er neyðugt at rætta upp á hesi viðurskifti við at lækka lønarútreiðslurnar ella við at hækka játtanina til vørur og tænastur.**

Í Mynd 2 (har allar útreiðslur eru tiknar við uttan meirhúsaleigan í 2018, liðaðar á lønir og aðrar útreiðslur) sæst, at "raksturin" hjá Setrinum hevur staðið í stað síðan 2008, meðan lønarútreiðslurnar eru hækkaðar við okkurt um 80%. Tað kunnu vera nógvar góðar orsøkir til hesa gongd, men hetta undirbyggir uppáhaldið um, at tað eiga at verða gjørdar javningar millum lønir og rakstur.




| | Roknskapur 2008 | Roknskapur 2009 | Roknskapur 2010 | Roknskapur 2011 | Roknskapur 2012 | Roknskapur 2013 | Roknskapur 2014 | Roknskapur 2015 | Roknskapur 2016 | Roknskapur 2017 | Játtan 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ársverk | 91,55 | 101,43 | 109,81 | 112,97 | 124,35 | 129,11 | 130,11 | 130,92 | 136,6 | 137,95 | 141,92 |
| Útreiðslur | 60.733 | 66.314 | 71.338 | 70.891 | 75.035 | 75.928 | 80.358 | 83.417 | 94.204 | 96.692 | 94.674 |

*Mynd 3. Gongdin í útreiðslum og ársverkum tíðarskeiðið 2008-2018 (2018 mett) (Kelda: Leiðslukunningarskipanin)*

Mynd 3 omanfyri vísir, at tað eru okkurt um 140 ársverk á Setrinum, og at bruttoútreiðslurnar, sum Setrið ræður yvir, eru um 95 mió. kr. í 2018. Talan er um, eftir føroyskum viðurskiftum, ein stóran stovn.




*Mynd 4. Tal av lesandi og arbeiðsársverk tíðarskeiðið 2008 til 2017* (Kelda: *Leiðslukunningarskipanin, Hagstovan og Próvbókin)*

Myndin 4 omanfyri vísir samanhangin millum arbeiðsársverk og tal av lesandi. Talan er ikki um studentaársverk, men um talið av innskrivaðum studentum, har nakrir í prinsippinum kunnu vera óvirknir, og aðrir ikki uppfylla krøvini til eitt studentaársverk.

Tað, sum er gleðiligt at staðfesta, er, at tað síðan 2012 eru 400 fleiri lesandi á Setrinum.

Hetta hevur nógv at siga fyri føroyska samfelagið. Tórshavn verður ríkað við fleiri ungum føroyingum, sum í fleiri førum annars vildu farið uttanlands at lesa. Vit verða ríkað við, at fleiri av hesum fólkunum hava familju, at tey eru arbeiðsorka í tænastuvinnuni, og at tey spyrja eftir tænastum, sum hoyra teimum ungu til. Eingin ivi er um, at Tórshavn er ein meira spennandi býur við hesum ungu fólkunum.




| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SSD | 40 | 68 | 121 | 98 | 104 | 146 | 172 | 243 | 297 | 336 |
| NVD | 43 | 41 | 67 | 44 | 76 | 65 | 86 | 77 | 136 | 118 |
| FMD | 63 | 59 | 63 | 74 | 79 | 55 | 53 | 54 | 65 | 60 |
| NÁD | 237 | 260 | 266 | 290 | 281 | 333 | 331 | 331 | 347 | 358 |
| SFD | 80 | 80 | 81 | 88 | 88 | 93 | 92 | 98 | 180 | 156 |

*Mynd 5. Lesandi á Fróðskaparsetri Føroya tíðarskeiðið 2008-2017.*

Myndin omanfyri vísir gongdina í talinum av lesandi fyri tíðarskeiðið 2008-2017 býtt á tær 5 deildirnar. Tølini fevna um lesandi, sum eru innskrivað til fulltíðarlestur, og lesandi, sum lesa ískoytisútbúgving til bachelor og partíðarútbúgving á t.d. masterstigi innan vegleiðing. Tølini fevna ikki um stakgreinalestur.




| | 2012-2013 | 2013-2014 | 2014-2015 | 2015-2016 | 2016-2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ekstern ECTS (góðskrivingar) | 1419,5 | 1171,5 | 1129,9 | 1163 | 1199 |
| Intern ECTS | 28091,5 | 30879,5 | 31062,5 | 33095 | 36522 |
| Ársverk | 492 | 534 | 537 | 571 | 629 |

*Mynd 6. Samlaða ECTS-framleiðslan á Setrinum og samsvarandi studentaársverkini fyri lestrarárini 2008/9 til 2016/17 (stakgreinalestur er ikki við)*

Grafurin í mynd 6 vísir, at ECTS-framleiðslan korrelerar við talið av lesandi á Setrinum, og harumframt vísa studentaársverkini, at "effektiva studentavirknið"[2], er nakað undir tí á donskum universitetum[3]. Munurin kann vera, at tað er veruliga eitt lægri lestrarvirkni í Føroyum, men eisini upperðarhátturin kann gera mun. Seinni í frágreiðingini verður mælt til at allýsa hetta mátitalið betri.




| | Roknskapur 2008 | Roknskapur 2009 | Roknskapur 2010 | Roknskapur 2011 | Roknskapur 2012 | Roknskapur 2013 | Roknskapur 2014 | Roknskapur 2015 | Roknskapur 2016 | Roknskapur 2017 | Játtan 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vip | 56,44 | 64,35 | 71,18 | 73,19 | 81,72 | 81,78 | 82,29 | 83,41 | 89,64 | 94,59 | 98,59 |
| Tap | 37,11 | 39,09 | 40,65 | 41,8 | 44,62 | 47,33 | 47,82 | 47,53 | 46,97 | 43,36 | 43,33 |

*Mynd 7. Býtið millum VIP og TAP á Setrinum tíðarskeiðið 2008 til 2017 (Kelda Leiðslukunningarskipanin og Setrið)*

Eini onnur viðurskifti, sum hava stóran týdning á einum hægri lærustovni, er stuðulsfunktionir hjá lærarum, granskarum og studentum. Bólkurin av teimum, ið hava hesar stuðulsfunktíonir, verður stundum kallaður TAP (Teknisk Administrativt Personale), meðan bólkurin av lærarum/granskarum stundum verður nevndur VIP (Videnskabeligt Personale).

*Allýsing av TAP: At veita lesandi hjálp, skipa fyri á deildunum bæði eitt og annað, leiða stovnin, skráseta lestrarvirkni, skráseta alt rundanum próvtøkur, gera lønir, føra roknskaparhald og hava innaneftirlit og mangt annað. Afturat hesum koma tøkniligar uppgávur, KT, viðlíkhald og reingerð.*

Eru stuðulsfunktiónir ikki á einum nøktandi stigi, verða dýrir granskara- og dekantímar brúktir upp á stuðulsuppgávur, vandi fyri øktum fráfalli millum lesandi, tað vera feilir í avgreiðslunum, størri sjúkrafrávera, meira neilig orka verður skapt í organisatiónini o.t.

Mynd 7 lýsir býtið millum VIP og TAP.

[2] Verður allýst sum staðin (ECTS/ 60)/tal lesandi. Fyri 2016/17 kann hetta verða roknað sum: (37721/60)/956=65%
[3] Donsku universitetini liggja um 76%.

*Allýsing av VIP: Tey, sum framleiða bachelorar, kandidatar og granska.*

Myndin lýsir, at meðan VIP-talið er (nærum) tvífaldað, er TAP-talið nærum óbroytt. Tey, sum virka í stuðulsfunktiónunum, siga, at stuðulsfunktiónirnar eru undirmannaðar. Setrið hevur í hesum arbeiðnum peikað á, at tað vanta 5 persónar í TAP-funktiónini sum er, um hendan skal vera loyst nøktandi. Millum annað er vaksandi tørvur á arbeiðsorku til starvsfólkamál, innaneftirlit og lestrarvegleiðing.




*Mynd 8. Býtið millum TAP/VIP á Setrinum samanborið við donsk universitet (kelda Setrið og DK-uni)*

So umframt at hava eitt skeivt býti millum rakstur og lønir, hevur Setrið eisini eina avbjóðing í býtinum millum VIP og TAP. Við óbroyttari játtan verður tað torført at rætta upp á hesi viðurskifti, tí hetta kemur at ganga beinleiðis yvir undirvísingarvirksemið. Tað er ringt at javna hesi viðurskifti, tí tað verður ringt politiskt at selja boðskapin at skifta út heitar hendur við kaldar hendur, sum ein orðaði seg.

Í mynd 8 er ein samanbering gjørd við donsk universitet, og tað sæst, at Setrið liggur væl niðanfyri miðal og liggur eisini niðanfyri tað universitetið, sum hevur lægsta TAP-talið, nevniliga RUC.  Fyri fíggjarárið 2008 vóru 0,66 TAP'arar fyri hvønn VIP'ara á Setrinum. Um vit brúka býtislykilin fyri 2008 fyri fíggjarárið 2017,

so skuldu Setrið havt 59[4] TAP'arar, sum er 16 fleiri, enn tað vóru í 2017. Sjálvandi er tað ikki brúk fyri hesum talinum, men fleiri enn tað eru í dag[5].

Tað er dýrt at reka eitt lítið samfelag sum Føroyar, tí vit ongantíð hava stórrakstrarfyrimun. Vit skulu upprætthalda funktiónir, oftast til nakrar fáar hendingar, samanborið við tað størra landið, sum hevur fleiri túsund hendingar. Hetta er, um vit tosa um fyrisiting, undirvísing og heilsu. Tí eru vit noydd at hugsa øðrvísi í Føroyum og ikki altíð avrita útlendskar loysnir.

## Samanbering[6] av kostnaði av universitetsvirksemi í Føroyum, Danmark og Grønlandi

Endamálið við hesum partinum er at skapa grundarlag fyri at samanbera útreiðslurnar av útbúgvingarvirkseminum á Fróðskaparsetri Føroya við onnur universitet/lond. Slík samanbering er ikki einføld, av tí at lond eru ymisk og universitet eru ymisk. Ymiskar útbúgvingar hava ymiskan kostnað. Um talan er um samanbering millum stór og smá universitet, kann spurningurin setast, um ikki størra universitetið hevur stórrakstrarfyrimun í slíkari samanbering.

Onnur viðurskifti kunnu eisini vera, sum gera, at útreiðslurnar ikki eru ordiliga samanbærligar, tí bæði búskettmeginreglur og roknskaparmeginreglur kunnu vera ymiskar frá landi til land. Eisini er spurningurin, hvat verður tikið við undir rakstur, og hvat verður hildið uttanfyri.

Men ein slík samanbering kann geva okkum kensluna av, hvar Setrið flýtur í mun til onnur universitet. Vit hava valt at grunda samanberingina á tveir parametrar:

1. Samlaða almenna fíggingin til universitetið til undirvísing og gransking (FUG)
2. Studentaársverkini hjá universitetinum (StÁ). Eitt studentaársverk er 60 ECTS.

Um vit taka útgangsstøði í hesum tølunum, ber til at rokna út kostnaðin fyri hvørt studentaársverk fyri ávíst ár (KStÁ). Hetta kann gerast fyri alt universitetið ella fyri hvørja útbúgving sær:

$$KStÁ = FUG/StÁ$$

[4] Síðan 2012 er KT-økið útveitt. Hetta merkir, at í minsta lagi tvey størv færri eru á Setrinum innan KT support. Við samanleggingini av Læraraskúlanum við Setrið, er eitt annað KT-starv niðurlagt (tils. 3 størv). Tað er javnað fyri hesi viðurskifti.

[5] Úr framløguni "UK Higher Education - briefing" frá bretsku sendistovuni í Danmark: Academic staff employed at UK universities: 206,870 (tvs. VIP red.)
Non-academic staff employed at UK universities: 212,840" (tvs. TAP red.

[6] Keldur:
Rakstrarjáttanin til Fróðskaparsetrið (Leiðslukunningarskipanin)
Próvbókin hjá Fróðskaparsetrinum
https://dkuni.dk/tal-og-fakta/beredskab/
https://da.uni.gl/om-os/tal-statistik.aspx

## Kostnaðurin av einum studentaársverki á Setrinum

Høvuðsamboðið hjá Setrinum at skráseta lestrarvirkni er KT-skipanin "Próvbókin". Her verða skrásettir upplýsingar um tey lesandi, t.e. hvørja útbúgving tann lesandi er innskrivaður til, hvørji skeið tann lesandi hevur staðið til ávíst tíðarskeið umframt ymiskt annað. Skipanin kann tí nýtast til at halda eftirlit við lestrarvirkninum hjá tí lesandi – og til ber tískil fyri hvørja útbúgving fyri ávíst tíðarskeið at trekkja út úr dátugrunninum, hvussu nógv studentaársverk eru lisin í tíðarskeiðnum.

| | 11-12 | 12-13 | 13-14 | 14-15 | 15-16 | 16-17 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| StÁ | 422 | 492 | 534 | 536 | 571 | 629 |
| Rakstur (tkr) | | 67.182 | 72.792 | 76.781 | 83.771 | 86.923 |
| KStÁ (tkr) | | 136 | 136 | 143 | 147 | 138 |
| | 11-12 | 12-13 | 13-14 | 14-15 | 15-16 | 16-17 |
| StÁ | 422 | 492 | 534 | 536 | 571 | 629 |

*Mynd 9. Kostnaðurin av studentaársverkum á Setrinum*

Rakstrarútreiðslurnar hjá Fróðskaparsetri Føroya verða lisnar úr kontu 118420 í Leiðslukunningarskipanini. Fyri 2016 vóru rakstrarútreiðslurnar 83,77 mió kr. (íroknað 1 mió av flyting frá FMR fyri Búskaparráðið, sum verður nýtt til útbúgvingarvirksemi).

Við hesum tølunum fæst, at studentaársverkini kosta millum 136 og 147 tkr/stá hesi árini.

## Kostnaðurin av einum studentaársverki á universitetinum í Grønlandi (Ilisimatusarfik)

Fyri at finna talið av studentaársverkum, er talið av útskrivaðum prógvum fyri hvørja útbúgving lisin av heimasíðuni hjá **Ilisimatusarfik**.

Her sæst, at talið av prógvum liggur millum 88 – 106 um árið. Talan er um bachelorútbúgvingar, sum eru 3 ella 4 ár til longdar, og kandidatútbúgvingar, sum eru 2 ár til longdar. Um vit siga, at talið av prógvum umboðar talið av fulltíðarlesandi, síggja vit, at talið av studentaársverkum fyri 2016 í mesta lagi er 384 (96 prógv x 4).

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| Útskrivaði prógv | 106 | 86 | 96 | 88 |
| StÁ (prógv*4) | | 344 | 384 | 352 |
| Rakstur (tkr) | | 82.545 | 83.976 | |
| KStÁ (tkr/StÁ) | | **240** | **219** | |

*Mynd 10. Kostnaðurin av einum studentaársverki í Grønlandi*

Rakstrarkostnaðurin fyri Universitetið í Grønlandi er uppgivin at vera 84 mió kr[7].

Hesi tølini geva ein miðal studentaársverkskostnað fyri Universitetið í Grønlandi uppá 219 tkr/StÁ fyri 2016.

## Kostnaðurin av einum studentaársverki á donskum universitetum

Av heimasíðuni hjá Danske Universiteter (www.dkuni.dk) finna vit upplýsingar um studentaársverk og rakstrarjáttan fyri hvørt av teimum 8 donsku universitetunum og fyri sektorin samlað sæð.

Fyri 2016 er uppgivið, at samlaða almenna rakstrarjáttanin til útbúgving og gransking er 15,7 mia kr., og at samlaðu studentaársverkini eru 117925. Hetta gevur ein miðal studentaársverkskostnað fyri 2016 uppá 133 tkr. Fyri tey einstøku universitetini liggur kostnaðurn frá 273 tkr – 68 tkr fyri hvørt studentaársverkið.

## Niðurstøða fyri samanburð




*Mynd 11. Samanbering av kostnaðinum av einum ársverkslesandi millum Føroyar, Danmark og Grønland*

Samanberingartølini skulu takast við stórum fyrivarni, tí sjálvandi er tað dýrari at reka eitt lítið universitet enn eitt stórt.

Um øll undirvísingin í Føroyum var granskingargrundað[8] og Setrið hevði lutfalsliga sama tal av TAP'arum, sum onnur universitet (sí Mynd 7), vildi kostnaðurin av einum studentaársverki á Setrinum vaksið við einum talið omanfyri 20%.

[7] Tøl úr grønlendska landsroknskapinum.

[8] Aðrastaðni í frágreiðingini verður upplýst, at tað er langt á mál, til øll undirvísingin á Setrinum er granskingargrundað. Tað hevði kostað meira enn 15 mió. kr. at uppfylla lógarkravið um, at øll undirvísing skal vera 100% granskingargrundað, alt annað líka.

# Ráðleggingarmyndil Setursins

## Endamálið við myndlinum

***At greina samanhangin og mekanismurnar millum input og output til ætlan, stýring og uppfylging av virkseminum á Setrinum.***

**Myndilin skal:**

Skapa gjøgnumskygni og forstáilsi, og skal vera grundarlagið undir samskifti á øllum stigum í fyrisitingini

Geva ábendingar um samanhangir og "hvat um"-greiningar

Verða nýttur í búsketteringsarbeiðinum í sambandi við fíggjarlóg

Lýsa, hvørjir parametrar og hvørjar støðutakanir eru avgerandi

**Ætlanin við myndlinum er ikki:**

At greina tann endaliga sannleikan

At greina upphæddir neyvt

At greina dagligdagin hjá tí einstaka

Hvussu myndilin kann verða brúktur sæst í fylgiskjali 2.

Myndilin verður gjørdur við støði í 80/20-meginregluni, sum í hesum føri merkir, at 20% av parametrunum greina 80% av samanhangunum.

## Modellering í mun til output

Tá ið vit skulu formulera ein myndil, sum skal vera grundarlagið undir avgerðini um m.a. at tilluta játtan, er ynskiligt at knýta játtanina til outputtið (endaframleiðsluna). T.d. at játtanin verður tillutað eftir talinum av lesandi.

Tað er so lætt at skilja, at 10% fleiri næmingar krevja t.d. 10% meira játtan.

Danir hava í nógv ár brúkt sokallaða taxameturskipan at tilluta játtan til universitet. Men tað kann vera heilt meiningsleyst, um talan er um lítla

framleiðslu (sum á Setrinum) at brúka endaframleiðsluna sum tillutingargrundarlag. T.d. gevur tað ikki meining at tilluta játtina til Smyril eftir, hvussu nógv fólk ferðast við Smyrli, tí avgerandi fyri útreiðslustigið hjá SSL er ferðaætlanin[9]. Á sama hátt er útboðið av skeiðum avgerandi fyri útreiðslustigið á Setrinum. Vóru trýtúsund lesandi á Setrinum, gav tað meira meining at modellera við støði í lesandi.

## Hvat triggar framleiðslufaktorarnar lønir og rakstur á Setrinum

Fyri eina játtan keypa vit framleiðslufaktorar, sum í seinasta enda skulu framleiða bachelorar, kandidatar og granskingarúrslit. Vit kunnu bólka framleiðslufaktorar í:

1. Lønir til undirvísing og gransking
2. Lønir til stuðulsfunktiónir
3. Keyp av vørum og tænastum
4. Húsaútreiðslur (leiga, el, hiti o.t.)

Niðanfyri skal í stuttum verða greitt frá, hvørjar mekanismur liggja aftanfyri útreiðslubólkarnar, sum í síðsta enda skulu til fyri at framleiða bachelorar, kandidatar og granskingarúrslit.

### Lønir til undirvísing og gransking

Nógv størsti framleiðslufaktorurin "lønir til undirvísing og gransking" knýtur seg sum áður nevnt ikki til talið av ársnæmingum ella til granskingarúrslit, men harafturmóti til:

- hvørjar útbúgvingar, og harvið skeið, valt verður at bjóða á hvørjum ári, tí hvør útbúgving krevur so og so nógva arbeiðstíð
- avgerðina um, hvussu stórur partur av lønartímunum skulu fara til gransking

Tað er eitt lógarkrav, at øll undirvísing skal vera granskingargrundað.

Ein minni partur av lønartímunum knýtir seg til talið av næmingum. Hetta er ein partur av próvtøkuvirkseminum. Men í fyrstu syftu hava vit valt at síggja burtur frá hesum, tí verkevnini knýtt til próvtøkuendamálið eru so umfevnandi, at vit hava valt at einfaldgera hendan parameturin og gera tað treytað av, hvussu nógvir tímar verða lisnir fyri hvørja útbúgving.

Sum greitt frá seinni, eigur at verða mett um, hvørt hesin parameturin eigur at vera ein konstantur í mun til skeiðið og ikki i mun til, hvussu nógvar undirvísingartímar skeiðið krevur.

[9] Sambært SSL kostar ein túrur um 43-46 túsund kr.

## Lønir til stuðulsfunktiónir

Stuðulsfunktiónir eru felagsfunktiónir, sum skulu til fyri at reka ein stovn sum Setrið. Eginleikin hjá stuðulsfunktiónum er, at støddin á teimum fyri ein stóran part er konstantur, tí tær skulu vera har uttan mun til, um talan er um 200 ella 300 næmingar. Har skal vera ein stjóri, eitt bókhald, vegleiðing o.t. Men tá ið virksemið veksur, veksur trýstið eisini á hesar funktiónirnar. Tað er serliga talið av lærarum og talið av næmingum, sum ávirkar trýstið á stuðulsfunktiónirnar. Tað tykist sambært viðgerðini í partinum frammanundan, at virksemið á Setrinum er komið til eitt stig, har stuðulsfunktiónirnar eru fult útnyttaðar, og kanska meira enn gott er. Tí er tað rætt at byggja í myndilin ein faktor, sum tekur hædd fyri tørvin á øktari játtan til stuðulsfunktiónirnar, tá ið virksemið veksur. Meira um hetta seinni.

Samanborið við lønir til undirvísing, sum er eitt meira objektivt staðfest tal, tí ein útbúgving krevur so og so nógva undirvísing og arbeiðstíðin rundanum undirvísing er rættiliga fastløgd, er játtanin til stuðulsfunktiónir ikki so objektivt løtt at staðfesta.

## Keyp av vørum og tænastum

Hetta er ferðing, skeið, undirvísingaramboð, teldur, innbúgv, telduútreiðslur. Nógv av hesum er rættiliga variabult í mun til virksemið á Setrinum. Um fleiri t.d. eru í starvi, skulu haldast fleiri útreiðslur til ferðing, teldur og forrit. Ein partur av hesum útreiðslum knýtir seg til talið av lesandi, og ein partur knýtir seg til talið av fólki í starvi. Somu atlit eru viðvíkjandi keypi av vørum og tænastum, sum omanfyri til stuðulsfunktiónir. Økt virksemi skapar størri tørv á vørum og tænastum, men tað finst ikki nakar "rættasti" faktorur.

## Húsaleiga, el og hiti

Hesar útreiðslur verða hildnar uttanfyri myndilinum, tí fysiski karmurin er rættiliga ógyrðin. Eitt annað viðurskifti er, at júst hesar útreiðslur kunnu vera sera varierandi frá stovni til stovn, tí onkuntíð eigur tað almenna bygningin, og tí býr stovnurin nærmast ókeypis, og aðrar tíðir býr stovnurin til leigu og rindar nógvar pengar fyri hvønn leigaðan fermetur. Skulu húsaútreiðslur modellerast, má tað vera eitt endamál við modelleringini, t.d. at tað almenna optimerar nýtsluna av fermetrum við at eisini teir stovnarnir, sum búgva í bygningum, sum tað almenna eigur, rinda ein fermetrapris.

# Samanhangurin frá játtan til kandidat

Í partinum omanfyri var greitt frá, hvar í tilgongdini teir ymsu framleiðslufaktorarnir verða "triggaðir" - nakað sum er avgerandi, tá ið myndilin verður skrúvaður saman. Í hesum partinum skal verða greitt nærri frá samanhanginum frá játtan til kandidat. Vit byrja við seinasta liðnum, Framleiðslur.




*Mynd 12. Mynd yvir samanhangin millum input (játtan) og output (ársnæmingar og granskingarúrslit)* ***á Setrinum***

Myndin omanfyri er beinagrindin í gjøgnumgongdini niðanfyri.

## IV: Framleiðslur (output)

Uttan mun til, at útreiðslurnar í modelleringssamanhangi ikki knýta seg beinleiðis til outputtið, so er neyðugt, at allýsingarnar av  outputtinum eru greiðar. Vit kalla outputtið fyri framleiðslur.

Framleiðslurnar  í myndlasamanhangi skulu vísa: Endaliga kostnaðin av hvørjum slagi av framleiðslu og nøgdina av hvørjum slagi av framleiðslu.

Kostnaðurin fyri hvørja framleiðslueind er: Beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur/framleiðslunøgd

Framleiðslurnar á Setrinum eru:

- **Undirvísingarpartur:** Bachelorar, Kandidatar
- **Granskingarpartur:**  Granskingarúrslit

## Hvat kosta framleiðslurnar?

Fyri at gera upp framleiðslukostnaðin, er neyðugt at føra útreiðslurnar beinleiðis til hesar framleiðslur. Undirvísing og gransking eru beinleiðis relateraðar, verri er við teimum óbeinleiðis útreiðslunum:

1. Lønir til stuðulsfunktiónir
2. Keyp av vørum og tænastum
3. Húsaútreiðslur (leiga, el, hiti o.t.)

Tað eru nógvir mátar at býta óbeinleiðis útreiðslurnar, og allir hættir hava sín fyrimun. Ivaleyst brúkar undirvísingarparturin størri part av óbeinleiðis útreiðslunum bæði so og so.

**Mælt verður til, at tað verður gjørd ein kvalifiserað meting av býtinum av óbeinleiðis útreiðslum millum útbúgving og rakstur.**

So leingi hetta ikki er gjørt, kann býtið millum lønir til gransking og undirvísing verða brúktur sum lykil til at býta óbeinleiðis útreiðslur.

## Hvussu nógv verður framleitt?

### *Undirvísing:*

Hvussu máta vit outputtið av lesandi? Tað er ymiskt, hvussu fólk lesa. Onkur lesur longri, og annar lesur styttri. Onkur annar stendur innskrivaður, men er óvirkin. Tí gevur ikki meining at rokna í tali av fólki. Neyðugt er at umrokna hesi til eina standardiseraða støðd. Á sama hátt sum størv verða roknað um til ársverk, verður lestur roknaður um til studentaársverk.

Studentaársverk í myndlasamanhangi er 60 staðin ECTS-stig[10].

Í hesi fasuni tosa vit um output, t.v.s. lidna framleiðslu. "Spill" í formi av lestraróvirkni, fráfalli, at fólk ikki megna krøvini, ella heilt aðrar orsøkir, merkir í veruleikanum, at veruliga lidna framleiðslan verður dýrari.

"Spillið" er ein týðandi útreiðslufaktor á einum universiteti. Tað eru nógvir hættir at gera "spillið" upp. M.a. er tíðspunktið, nær uppgerðin fer fram rættiliga avgerandi, tí tað er vanligt, at fólk fella frá fyrstu 2 mánaðirnar, tí lestrarvalið ikki var rætt.

**Mælt verður til, at tað verður allýst eitt "spill-ratio", sum er við í ársrapporteringini.**

Sí partin Uppfylging í mun til ætlan**.**

### *Gransking:*

Tað er ein stór avbjóðing at máta framleiðsluna av gransking í nøgd og góðsku. Hendan spurningin arbeiðir Setrið við. Hetta er ikki ein partur av hesum arbeiðinum.

**Mælt verður til, at tað skjótast gjørligt verður funnar meginreglur viðvíkjandi meting av framleiðsluni av gransking.**

## III: Framleiðslusløg (útbúgvingar)

**Framleiðslusløgini eru:**

[10] ECTS er ein leistur at flokka lestrarinnsatsin hjá einum lesandi. Ein ársnæmingur skal framleiða 60 ECTS-stig.

- Slag av útbúgvingum, t.d. Námsfrøði, Søga, Løgfrøði, sum verða boðin út eitt ár
- Gransking. Tað er ymiskt, hvussu málið um gransking hevur verið. Á onkrum útbúgvingum er talið 70% granskarar, og á øðrum útbúgvingum er talið niðri á 30%. Meira um hetta evnið seinni.

## Slag av útbúgvingum:

Tá ið ein bachelorútbúgving verður boðin út eitt ár, hevur Setrið skyldu at hava hesa útbúgvingina gangangdi í trý ár. Hetta uttan mun til, um tað eru bara 3 næmingar, sum halda fram á 2. ári. Ein nýggj útbúgving krevur eisini sum oftast, at tað verða sett nýggj størv við granskingarførleika. Tí er avgerðin um at bjóða út eina útbúgving fullkomiliga avgerandi og kritisk fyri búskettið.

Í modelleringini sæst, hvørjar útbúgvingar verða bodnar út.

## Gransking

Smb. §2 í LØGTINGSLÓG NR. 58 FRÁ 9. JUNI 2008 UM FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA, SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 51 FRÁ 8. MAI 2012

*Uppgáva Fróðskaparsetur Føroya er at inna gransking og veita frálæru sambært § 3. Endamálið er at grunda alla frálæru á gransking og veita frálæru á hægsta altjóða stigi…….*

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um Setrið Løgtingsmál nr. 156/2008: Uppskot til løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (University of Faroe Islands) stendur:
”Hetta merkir, at lærarar á Læraraskúlanum og á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum fakliga skulu uppstigast. Hartil kemur, at hesir lærarar í framtíðini skulu nýta ávísan prosentpart av arbeiðstíðini til gransking eins og teirra komandi starvsfelagar á Setrinum. Henda tilgongd kann av praktiskum orsøkum bert fremjast í stigum, og verður mett at taka umleið fimm ár. Mett verður, at henda tilgongd fer at krevja, at 1 1⁄2 - 2 mió. kr. verða settar av árliga í eitt fimm ára tíðarskeið frá 2008 at rokna, tó so at metti tørvurin í 2008 verður mettur til millum eina hálva og eina millión kr.

Tað vil siga, at tað er eitt lógarkrav, at øll undirvísing skal vera granskingargrundað. Sum tað framgongur í myndlaútrokningunum (fylgiskjal 2, teigur “lutfall granskingargrundað”), er hetta lógarkrav ikki uppfylt. Serliga halta útbúgvingarnar á gamla Sjúkrasystraskúlanum og Læraraskúlanum. Orsøkin til støðuna er, at tað grundleggjandi er ein játtanarspurningur. Ein onnur orsøk er sjálvandi, at tað letur seg ikki gera 100%, so leingi leysir lærarar eru inni og undirvísa. Í 2017 vóru sambært Leiðslukunningarskipanini brúktar 4,4 mió. kr. til leysar lønir, og av hesum vórðu brúktar 3,4 mió. kr. í leysum lønum til akademikarar, umframt umleið 800 tkr. til útlendskar undirvísarar, tvs. 4,2 mió. kr. í leysum lønum til akademikarar.

Tað verður eisini sagt, at tað krevur eina tillagingartíð, tí fleiri av teimum, sum eru í starvi í dag, ikki uppfylla krøvini at vera granskarar. Men tað eru 10 ár síðan omanfyristandandi lógartekstur varð samtyktur.

Skal lógarkravið uppfyllast um granskingargrundaða undirvísing, hevði hetta merkt fyri Setrið 2017, alt annað líka, at lønarútreiðslurnar høvdu verið 15 mió. kr. hægri,

um talan var um 100% granskingargrundaða undirvísing. Men tað veldst sjálvandi eisini um, hvussu lógarkravið um granskingargrundaða undirvísing skal tulkast.

Tað tykist ikki sum, at hetta er ein parametur, sum er serliga sjónligur í játtanararbeiðinum, hóast hetta er lógarásett.

**Mælt verður til, at myndugleikarnir og Setrið viðgera, hvat lógarkravið um at øll undirvísing skal verða granskingargrundað merkir og leggja eina ætlan fyri, hvussu kravið verður uppfylt.**

## II: Framleiðslutilgongd:

### Alment:

**Arbeiðstíð, sum fer til starvsfólkaviðurskifti:** Ikki øll arbeiðstíðin fer til framleiðslu. Munandi partur av arbeiðstíðini fer til onnur endamál, tí tað kostar at hava eina organisatión gangandi. Av hesum verður roknað við, at okkurt sum:

10% av arbeiðstíðini fara til starvsfólkaviðurskifti

Starvsfólkaviðurskifti er sjúka, skeið, hátíðarhald, móttøkur, fundarvirksemi og eldrapolitikkur (serstakt fyri Setrið). Kanska talið er hægri, ella tað er lægri, men hildið verður ikki, at 10%, sum svarar til okkurt um 22 arbeiðsdagar, er so langt frá veruleikanum. Í talvuni er talið kvalifiserað.

**Mælt verður til, at faktorur til starvsfólkaviðurskifti verður kvalifiseraður meira, við at fleiri av hesum viðurskiftum verða skrásett av leiðarunum.**

| | | |
|---|---|---|
| Sjúka[11] | 3-4% av arbeiðstíð | 5-7 dagar |
| Fundarvirksemi<br>Ikki beinleiðis undirvísingarrelaterað | 1-2 tímar/viku | 6-12 dagar |
| Útferðir, starvsfólkadagar, hátíðarhald, fríggjamorgnakaffi, fyrilestrar, generell skeið o.t. | | 6-9 dagar |
| Tilsamans | | 19-28 dagar |

### Undirvísing

**Undirvísingartíð:** Tá ið vit vita, hvussu nógv skeið verða boðin út, vita vit eisini, hvussu nógvir "undirvísingartímar" skulu verða brúktir til at framleiða hesi skeiðini.

Snúningsásurin í myndlinum er, hvussu nógvir undirvísingartímar verða hildnir eitt ár.

[11] Talið er ein meting við støði í metingum frá fyrisitingini á Setrinum, donskum hagtølum og sjúkratølum frá Gjaldstovuni

Alt verður roknað við støði í undirvísing. Í myndlinum verður gjørt nógv burturúr at sjónliggera samanhangin millum ætlaða virksemið í ECTS-stigum fyri tær ymsu útbúgvingarnar, og hvussu nógv skeið ætlanin skapar, og hvussu nógva undirvísingartíð tey ymsu skeiðini krevja.

| | Undirvíst ECTS/ár | skeiðs-stødd normerað | tal av skeiðum | vikur | t/viku | tímar/ skeið | tímar/ ects |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lærara Bed | 420 | 15 | 28 | 10 | 13 | 130 | 8,7 |
| Námsfrøði Bed | 300 | 15 | 20,0 | 10 | 13 | 130 | 8,7 |
| | | | | | | | |
| Føroyskt BA | 180 | 10 | 18 | 14 | 4 | 56 | 5,6 |
| Føroyskt MA | 120 | 10 | 12 | 14 | 3 | 42 | 4,2 |
| | | | | | | | |
| KT-verkfrøði | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 |
| Vistfrøði | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 |

*Mynd 13. Modellering av undirvísingarparti*

Myndilin skapar ein samanhang millum, hvussu ymiskt tað er, hvussu nógvir tímar skulu til fyri at framleiða eitt ECTS-stig. Vit síggja í døminum í Mynd 13, sum er tikið úr myndilsúrokningini í fylgiskjali 2, at MA í føroyskum krevur 4,2 tímar fyri hvørt ECTS-stigið, og KT-verkfrøði krevur 10,7 tímar, t.e. meira enn tvífalt.

Munurin er sjálvandi grundaður á rationell viðurskifti, men uttan iva er eisini ein søgulig orsøk. Tí verður hetta ein spurningur, sum fokus verður sett á framyvir.

**Fyrireikingartíðin** er ein beinleiðis avleiddur faktor av undirvísingartíðini. Sáttmálin fyri leysar lærarar sigur, at fyri hvønn lisnan tíma á bachelorstigi, verða brúktir 2 tímar til fyrireiking. Hetta verður eisini brúkt fyri lærarar í føstum starvi. Fyri masterútbúgvingarnar er hesin faktorur 3 tímar. Hetta er fastlagt út frá metingum, sum leiðslurnar á Setrinum hava gjørt gjøgnum árini. Hesir faktorar eru til umrøðu millum starvsfólk, og verður mett, at hesir eru í lægra lagi og eiga at verða settir til ávíkavíst 4 og 5, um talan skal vera um granskingargrundaða undirvísing.

**Mælt verður til, at áðrenn ein avgerð um at hækka fyrireikingartíðina verður tikin, verður hendan clearað við ráðið og lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.**

Sí meira um hetta evni seinni.

**Próvtøkur og fyrireiking:** Endamálið próvtøkur er fundamentalt á einum universiteti og fevnir um hópin av ymsum aktivitetum, sum í høvuðsheitum eru:

- Gera uppgávur, fyrireika próvtøku, føra upp til próvtøku, og vegleiðing
- Próvdómarasamsýningar (sí allar reglurnar um hetta á heimasíðuni hjá Setrinum)

Skulu allir møguleikarnir við próvtøkum modellerast, gerst myndilin ógvuliga kompleksur, og óvissurnar gerast neyvan minni, tí tað verða kravdir fleiri inputsvariablar, sum eisini eru knýttir til fleiri óvissur.

Í myndlasamanhangi hava vit valt at úttrykkja hetta virksemið sum ein tíma av hvørjum undirvísingartíma. Vit hava roynt at rokna upp á nøkur dømi, við nógvum næmingum og fáum næmingum, og vísir tað seg, at 1 tími fyri hvønn undirvísingartíma ikki er ein kritisk stødd. Í staðin fyri at fara inn í langar torgreiddar diskussiónir um rættleikan kann vera sagt, at hetta er tað stigið, sum deildirnar skulu brúka upp á hetta virksemið.

Ein annar møguleiki, sum er viðgjørdur, er at broyta hetta til ein konstant fyri hvørt skeiðið, heldur enn tímar/skeið. Grundgevingin er, at hvørt eitt skeið krevur 20 ella 40 undirvísingartímar, skapar tað sama próvtøkuvirksemi.

**Arbeiðstíð til annað útbúgvingarvirksemi:** Talan er eisini um annað arbeiði, sum relaterar seg til tað konkreta undirvísingararbeiðið, sum t.d. at fyrireika og eftirmeta skeið, fakligt nevndararbeiði og tílíkt. Hesin faktorurin er mettur at vera 30 minuttir av hvørjum undirvísingartíma. Tað vil siga, at tekur eitt skeið 100 undirvísingartímar, so kann deildin ráða yvir 50 tímum til ymiskt arbeiði. Tað er torført at meta um, hvørt hesin parameturin er rættur ella skeivur, men ein vinkul at staðfesta henda faktorin er, at hetta er tað, sum leiðslan setur av til endamálið. So mugu deildirnar ætla og raðfesta eftir hesum.

Mælt verður til at allýsa faktorin **arbeiðstíð annað útbúgvingararbeiði** neyvari.

## Útrokning av tímafaktorum

Undirvísingartímar
Tá ið vit kenna skeiðsskránna eitt ár, kenna vit samlaða tímatalið, sum skal til fyri at framleiða hvørt einstakt skeiðsslag.

Tímafaktorar/undirvísingartíma

a) 1 undirvísingartími gevur
b) 2 ella 3 fyrireikingartímar o.t. fyri ávikavist bachelorstig og masterstig fyri hvønn undirvísingartíma (a)
c) 1 tíma til próvtøkuendamálið fyri hvønn undirvísingartíma (a)
d) 0,5 tíma til annað útbúgvingarvirksemi fyri hvønn undirvísingartíma (a)
e) 0,5 tíma til starvsfólkaviðurskifti (10% av a+b+c+d=0,5 tíma avrundað)

Hetta gevur:

Tímafaktor Bachelor-undirvísing: 5 tímar (avrundað)
Tímafaktor Master-undirvísing: 6 tímar (avrundað)

Dømi undirvísingartímar og tímafaktor:V
*Verður eitt skeið bjóðað út á eini masterútbúgving, sum krevur 50 undirvísingartímar, verða 300 tímar miðfirraðir til deildina at ráða yvir.*

Tað vil við øðrum orðum siga, at ein lisin tími telur í myndlasamanhangi 5 tímar, um talan er um bachelorundirvísing, og 6 tímar, um talan er um masterundervísing.

Hetta er grundarlagið undir miðfirringini av tímum til deildirnar.

Dentur skal verða lagdur á, at hetta ikki er ein absolutt regla fyri tann einkulta starvsetta. Hetta er ein pulja av tímum, sum verður miðfirrað til deildirnar at ráða yvir. Dekanurin kann taka hædd fyri, hvørjar royndir viðkomandi hevur, hvørjar førleikar, stødd á flokkum, hvørt talan er um nýtt fakøki ella ikki, tá ið árliga virksemisætlanin verður løgd. Ella sagt við øðrum orðum: dekanurin fær heimild at leiða og fordeila arbeiðið á deildini innanfyri henda karmin.

### Gransking

Í dag verður miðað eftir, at tá ið talan er um eitt granskingarstarv, fer 50% av samlaðu arbeiðstíðini til undirvísing, og hini 50% fara til gransking. Tað sigur seg sjálvt, at hesin parameturin er rættiliga avgerandi fyri útreiðslurnar til Setrið. Broyta vit parameturin til undirvísing/gransking frá 50/50 til 60/40, vísir myndilin, at útreiðslurnar við støði í 2017 fyritreytum lækka við okkurt um 2,5 mió. kr.

Sambært Setrinum, er 50/50-býtið eisini vanliga býtið á øðrum universitetum.

Vit hava konkret hugt eftir ásetingunum fyri grønlendska universitetið Illisimatursarfik um arbeiðstíð fyri lærarar og granskarar. Har stendur, at miðað skal vera eftir, at av arbeiðstíðini hjá einum granskara skal 45% av tíðini fara til gransking. Uttanfyri hetta liggur tíð til fyrisiting.

## I: Játtan og tilfeingi

Tilfeingið fyri at framleiða Bachelorar, Kandidatar, einkultfaklesandi og granskingarúrslit er viðgjørt niðanfyri. Í mynd 13 sæst lutfallið millum útreiðslusløgini.




*Mynd 14. Býtið av útreiðslum á Setrinum 2017*

## Lønir til undirvísing og gransking

Spurningurin her er, hvussu nógva arbeiðstíð levera lærarar og granskarar í føstum starvi til undirvísingartilgongdina. Setrið roknar við, at árliga arbeiðstímatalið er 1651 tímar. Tá ið vit kenna lønina tilsamans fyri ein lærara og granskara, kunnu vit rokna út, hvat ein tími kostar.

## Arbeiðstíð til stuðulsfunktionir

Grundleggjandi her er, hvussu nógv verður játtað til stuðulsfunktiónir.

Tað er ymiskt, hvussu fleiri lærarar og fleiri næmingar ávirka stuðulsfunktiónirnar. Tí eigur at verða gjørd ein meting av, hvat t.d. 50% øking av starvsettum og 50% fleiri ársnæmingar skapa av tørvi á stuðulsfunktiónum, og so rokna ein faktor fyri fleiri starvssett og ein faktor fyri fleiri studentaársverk og leggja hetta oman á eitt basisár, sum kann t.d. vera 2017. Í kassanum niðanfyri er víst eitt dømi, hvussu hetta kann verða gjørt.

Sjálvandi er hesin faktorurin grundaður á, hvat tænastustig Setrið vil leggja seg á, tí eru hesir báðir parametrarnir politiskir. Eisini er spurningurin, um útgangsstigið er nøktandi, tí ført hevur verið fram, at tað – sum nú er – vanta 4-5 ársverk í Stuðulsfunktiónini. Hetta er ein spurningur um interna raðfesting á Setrinum, men tað, sum hevur avgerandi týdning í myndlaarbeiðinum, er, at tað so ella so verður tikin hædd fyri øktum virksemi i myndlasamanhangi. Við øðrum orðum, at Stuðulsfunktiónirnar fáa sín lutfalsliga part av kakuni, um talan er um eina givna játtan.

| | |
|---|---|
| *Dømi:* | |
| *Lønarútreiðslur stuðulsfunktionir 2017* | *20 mió. kr.* |
| *Broyting í ársnæmingum 2017-2018* | *100* |
| *Broyting í lærara og granskingarársverkum* | *10* |
| *Faktor stuðulsfunktiónir/næming* | *8.000* |
| *Faktor stuðulsfunktiónir/lærara* | *40.000* |
| *Hetta vildi merkt, at Setrið í sínum búskettarbeiði skuldi tillutað Stuðulsfunktiónunum:* | |
| *20.000.000+(100x8.000)+(10*40.000)= 21.200.000 kr., t.v.s. at økingin er 1,2 mió. kr., sum eru tvey akademikarastørv.* | |

**Mælt verður til, at leiðslan á Setrinum, saman við Mentamálaráðnum, tekur støðu til, hvat parametrarnir til stuðulsfunktiónirnar skulu vera og brúkar henda parameturin bæði í samskiftinum í fíggjarlógararbeiðinum og til raðfesting, tá ið innanhýsis búskettini vera gjørd.**

**Mælt verður eisini til, at tað verður gjørd ein lýsing av, hvør tørvurin er á stuðulsfunktiónum.**

### Vørur og tænastur

Tá ið umræður vørur og tænastur, gera júst somu meginreglur seg galdandi, sum lýst omanfyri.

### Húsaútreiðslur

Húsaútreiðslur vera í myndlasamanhangi tiknar upp til, hvat væntað verður, at tær kosta, og tá uppfylgingin fer fram, hvat tær kostaðu.

## Hvussu kann myndilin verða brúktur í dialoginum við Mentamálaráðið

Uttan mun til, at Setrið er ein óheftur stovnur, sum hevur eitt sera stórt frælsi, er tað í síðsta enda Mentamálaráðið, sum hevur ábyrgdina av Setrinum.

Tað er Mentamálaráðið:

- sum skal politiskt grundgeva fyri játtanarviðurskiftunum, og hví Setrið skal hava eina meirjáttan á hvørjum ári. Tí skal ráðið síggja í rapporteringini sambært myndlinum, effektivar broytingar í undirvísingarvirkseminum.

- sum stendur inni fyri, at pengarnir á Setrinum verða brúktir skynsamt, sí rundskrivið um neyðug búskaparlig atlit. Tí má ráðið síggja, hvat ein útbúgving kostar fyri hvønn næming og raðfesta við støði í hesum.
- sum stendur inni fyri rættleikanum av teimum upplýsingum, sum verða framleiddar av Setrinum. Her verður serliga hugsað um ætlanir, Próvbók og roknskaparviðurskifti alment.
- sum í síðsta enda stendur inni fyri, at tær avgerðir, sum verða gjørdar innan lønarøkið, eru rættar. Her má ráðið verða við til regluliga at góðkenna teir ymsu parametrarnar í myndlinum.

Tí eigur myndilin at vera snúningspunktið í samskiftinum við ráðið.

Um ráðið skal hava eitt jaligt samskifti við Setrið er neyðugt, at ráðið ikki brúkar Ráðleggingarmyndil Setursins sum eitt eftirlitsamboð, men brúkar myndilin í ætlanar- og uppfylgingartilgongdini. Hetta krevur fólk við stórari vitan um viðurskiftini á Setrinum. Ein persónur, sum hevur eina dagliga gongd á Setrinum – vit kunnu kallað viðkomandi fyri ein samskiftispersón ella umsjónarpersón – og sum kann síggja:

- hvussu myndilin virkar í verki
- sum er við til mánaðarligu uppfylgingarfundirnar
- er við í fíggjarlógartilgongdini osv.

Hesin persónur hevði kunnað skapt ein virðisvøkstur í dialoginum millum Setrið og ráðið, og hevði minkað um frástøðuna millum ráðið og Setrið. Talan kann vera um, at ein persónur í stýrisdeildini arbeiðir 1-2 dagar á Setrinum um vikuna.

**Mælt verður til, at Mentamálaráðið setur ein samskiftispersón (controllara), sum er partur av dagligu tilgongdunum á Setrinum einar 1-2 dagar um vikuna, og sum vísir til ráðið.**

## Hvussu kann myndilin verða brúktur á Setrinum

Myndilin greinar í stórum trekkum, hvat eitt ávíst útbúgvingarvirksemi á Setrinum kostar, givið eina røð av fyritreytum, har fleiri eru til diskussión. Myndilin kann verða brúktur í ætlanarsamanhangi tvs.:

- í einum dialogi við deildirnar um, hvat eitt ætlað virksemi kostar næsta ár
- í eini raðfesting hjá leiðsluni, hvussu ein avmarkað játtan kann vera brúkt
- at seta fokus á, hvat ávísar avgerðir kosta
- at diskutera, hví onkur undirvísing krevur fleiri tímar enn aðrar

Tá ið virksemið er fastlagt, og deildirnar skulu hava sína tímapulju, er neyðugt at fara inn meira detaljerað.

Dømi:

- Eru lutfalsliga fleiri skeið bjóðað út á eini deild í mun til eina aðra, og hetta merkir ymiskan belastning á próvtøkuendamálið, eigur at verða javnað fyri hesi viðurskifti.
- Um annað útbúgvingarvirksemi belastar ymiskt millum deildirnar, tí á eini deild eru fleiri nýggj skeið í mun til á eini aðrari, er eisini neyðugt at javna fyri hesum.
- Um langtíðarsjúka rakar eina deild.

Tí verður mælt til, at rektarin hevur eina tímapulju at gera gott við, tá ið javnað verður í mun til veruligu viðurskiftini. Tað ber ikki altíð til, tá ið modellerað verður, at taka hædd fyri langtíðarsjúku. Verður hetta aktuelt fyri eina deild, eigur rektarin at kompensera viðkomandi deild fyri hesi viðurskifti við at hava eina tímapulju ella við at javna virksemið umaftur.

Tað týdningarmesta er, at tey, sum skulu virka undir myndlinum, ikki kenna seg fangað av nøkrum reglum, sum ikki hava hald í veruleikanum, men at tey kenna myndilin sum eina rættvísa skipan, har tey hava eitt frælsi at brúka ta vitan og teir møguleikar, sum liggja í teimum lyklastørvum, tey sita í.

Formaðurin í arbeiðsbólkinum hevur saman við rektaranum havt fund við dekanarnar, har greitt varð frá meginreglunum aftanfyri myndilin, og at hetta í veruleikanum er ein miðfirring av heimildini at ráðleggja virksemið á deildunum. Dentur varð lagdur á, at talan var ikki eitt eftirlitsamboð, men fyrst og fremst eitt ætlanaramboð, sum skal lýsa samanhangir og skapa gjøgnumskygni. Dekanarnir vóru jaligir, men fleiri av teimum løgdu dent á, at tann faktorur, sum verður mæltur til í myndlinum, ikki er nøktandi, tá ið umræður undirvísing á masterútbúgvingum.

## Uppfylging í mun til ætlan

Tað er avgerandi, at tað verður fylgt upp á tær útrokningar, sum verða gjørdar við myndlinum. I Mynd 15. Frávik millum myndil og veruleika er fyri 2017 roynt at vísa, at tað, sum verður roknað við myndlinum, eisini er tað, sum veruliga er farið fram.

| A | B | C | X | Y | Z | AA | AB | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | roknaði ársverk | Kostnaður | | Lønarkostnaðu r 2017 BSL | Ársverk BSL | gr ár |
| | Lærara Bed | | 28,8 | 17.974.501 | **NÁD** | **17.492.231** | 27,65 | |
| | Námsfrøði Bed | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| | Føroyskt BA | | 12,7 | 7.159.858 | **FMD** | 6.839.164 | 12,1 | |
| | Føroyskt MA | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| | KT-verkfrøði | | 25,1 | 15.125.140 | **NVD** | 12.670.345 | 20,0 | |
| | Vistfrøði | | | | | | | |
| | Havlívfrøði | | | | | | | |
| | Mýlska lívfrøði | | | | | | | |
| | Orkuverkfrøði | | | | | | | |
| | Støddfrøði | | | | | | | |
| | Orkuvísindi | | | | | | | |
| | Orkuvísindi og støddfrøði | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| | Sjúkrarøktarfrøði | | 18,8 | 11.543.587 | **SFD** | 12.540.595 | 20,2 | |
| | Fólkaheilsa | | | | | | | |
| | | | | | | | | |
| | Sosialvísindi | | 27,7 | 17.250.366 | **SSD** | 15.532.751 | 25,0 | |
| | Politikkur og umsiting | | | | | | | |

*Mynd 15. Frávik millum myndil og veruleika teigur x og y eru roknaðir við myndlinum og teigur AA og AB er frá Búskaparskipan landsins*

Sjálvandi eru nakrar fyritreytir, sum mugu vera upp á pláss, t.e. at:

- Tað verður brúktur ein rættur miðallønarsatsur
- At tað veruliga talið av undirvísingartímum og framleiðslan av ECTS-stigum verða skrásett

Er frávik millum tað, sum myndilin roknar út, og tey faktisku tølini frá BSL, kann hetta skyldast fleiri viðurskifti. Er talið frá myndlinum hægri kann vera, at tað verða granskaðir færri tímar enn tað, sum varð ætlað.

Annað kann vera, at deildirnar greiða at útnytta tímafaktorin effektivari, enn hann er normeraður til, t.d. um ein undirvísingartími á bachelor kostar 4 tímar heldur enn 5 tímar, sum er ein fyritreyt í myndlinum.

**Mælt verður til, at arbeiðið við myndlinum – ætlan, fremjing og uppfylging – verður avtalað millum ráðið og Setrið.**

Í uppfylgingarrapportini, har myndilin verður verificeraður, skulu m.a. hesi evni verða viðgjørd:

1. ECTS-framleiðslan verður dagførd við veruligu framleiðsluni
2. Studentaársverk verða dagførd við skrásetingum í Próvbókini
3. Um hædd verður tikin fyri serligum viðurskiftum, sí partin hvussu myndilin kann verða nýttur á Setrinum, t.d. at ein deild fær tillutað 100 tímar fyri okkurt ávíst viðurskifti, at hetta verður skrásett í uppfylgingini.
4. Ársverk og roknskapartøl verða dagførd frá BSL við neyðugum tillagingum.
5. Eina viðgerð av, hvussu fyritreytirnar í parametrunum halda.

6. Hvørjar broytingar mælt verður til at fremja fyri at gera myndilin betri bæði so og so.

Her eigur innaneftirlitið ella controllarafunktiónin at hava ein týðandi leiklut.

## Frágreiðing til myndilin

Høvuðsendamálið við myndlinum er at rokna út tann partin av lønarkostnaðinum, ið er beinleiðis tongdur at undirvísing, gransking og fyrireiking o.a. í sambandi við undirvísing. Hetta verður gjørt fyri hvørja útbúgving sær.

Í fylgiskjali 2 er víst, hvussu myndilin er nýttur.

**Tal av undirvísingartímum**
Fyrst verður funnið fram til samlaðu tímanýtsluna til hvørja útbúgving. Hetta verður gjørt við at hyggja at, hvussu nógv skeið verða útboðin á útbúgvingini, og hvussu stórt tímatal hvørt skeiðið hevur, og hvussu nógvar vikur skeiðið varar. Við at falda talið av skeiðum við tímatalinum fyri hvørt skeiðið, fæst samlaða útboðið av undirvísingartímum.

Tó er tað soleiðis, at ávís skeið eru skipað í felag við onnur skeið, og tí ber ávísa útbúgvingin ikki allan kostnaðin. Fyri at taka hædd fyri hesum, er eisini neyðugt at hava ein variabul inni, sum ásetur í hvønn mun útbúgvingin gagnýtir skeið frá øðrum útbúgvingum. Er variabulin 1, ber útbúgvingin allan kostnaðin. Er hann 0,5, ber útbúgvingin hálvan kostnaðin o.s.fr. Tað vil siga:

$$Undirvísingartímar = UT = P \cdot ST \cdot TS$$

Har ST er talið av skeiðum og TS  er tímatalið á skeiðnum.

Í døminum niðanfyri verður víst, hvussu UT verður roknað fyri undirvísingarnar á Føroyamálsdeildini.

| Útbúgving | on/off | Undirvíst ECTS/ár | skeiðsstødd normerað | tal av skeiðum | vikur | t/viku | tímar/skeið TS | Undirvísingar-tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | *P* | *ECTS* | *NO* | *ST=ECTS/NO* | *V* | *TV* | *TS=V*TV* | *UT=P*TS*ST* |
| Føroyskt BA | 1 | 180 | 10 | 18 | 14 | 4 | 56 | 1.008 |
| Føroyskt MA | 0,75 | 120 | 10 | 12 | 14 | 3 | 42 | 504 |

**Tímatal til útbúgving**
Tá funnið er fram til talið av undirvísingartímum, verður upproknað til samlaða tímatalið, sum skal til fyri at kunna veita ætlaða talið. Hetta verður gjørt við at falda talið av undirvísingartímum við einum faktori, sum er eitt úttryk fyri, hvussu krevjandi undirvísingin er í mun til fyrireiking, vegleiðing, próvdøming og annað útbúgvingararbeiði. Harumframt má faktorurin eisini taka hædd fyri, at effektiva arbeiðstíðin hjá hvørjum undirvísara er nakað lægri enn fulla árstímatalið.

Niðanfyri verður víst hvussu faktorurin verður útleiddur.

Roknað verður við, at hvør undirvísingartími hevur við sær ávísa fyrireikingartíð. Tað vil siga, at undirvísing og fyrireiking kann finnast sum:

$$Undirvísing\ og\ fyrireiking = UT\ \cdot (1 + FT)$$

Har FT er talið av tímum, ið skulu til fyri at fyrireika ein undirvísingartíma.

Harumframt má takast hædd fyri próvdøming og vegleiðing. Við at leggja hetta afturat fæst samlaða tímatalið til undirvísing soleiðis:

$$Samlað\ undirvísingarbyrða = UT \cdot (1 + FT + VP)$$

Har VP sigur nakað um, hvussu nógvar tímar av vegleiðing og próvdøming hvør undirvísingartími hevur við sær.

Harumframt verður tikið við, at tað at undirvísa eisini hevur annað arbeiði við sær, sum ikki beinleiðis er tengt at undirvísingini, men sum verður kravt av undirvísaranum. Samlað arbeiðstíð verður soleiðis roknað sum:

$$Samlað\ arbeiðstíð = UT \cdot (1 + FT + VP) \cdot (1 + AU)$$

Har AU er eitt úttrykk fyri, hvussu nógv prosent annað undirvísingararbeiði økir um arbeiðstíðina.

At enda verður eisini tikið hædd fyri, at effektiva arbeiðstíðin hjá hvørjum undirvísara ikki er 100%. Her verður t.d. hugsað um ymiskar uppgávur, sum eru tengdar at felagsskapinum á arbeiðsplássinum, so sum trivnaðarátøk, útferðir, óformligt kjak, flutningur o.t. Roknast má tí við nakað minni enn 100%.

$$Effektiv\ samlað\ arbeiðstíð = \frac{UT \cdot (1 + FT + VP) \cdot (1 + AU)}{(1 - E)} = UT \cdot F;$$

$$F = \frac{(1 + FT + VP) \cdot (1 + AU)}{(1 - E)}$$

Har E lýsir prosentmunin millum fulla og veruliga arbeiðstíð.

**Faktorurin**
Fyri at finna fram til faktorin F má sostatt metast um, hvussu nógv nevndu viðurskifti hvør í sínum lagi hava at siga í mun til hvønn undirvísingartíma. Her eru gjørdar hesar metingar:

*Fyrireikingartíð (FT)*
Mett verður, at hvør undirvísingartími á Master-útbúgvingum hevur við sær 3 tímar fyrireiking, og at hvør tími á BA-útbúgvingum hevur við sær 2 tímar fyrireiking. Tvs. FT=3 fyri MA og FT=2 fyri BA.

*Vegleiðing og próvdøming (VP)*
Her verður mett at hvør undirvísingartími hevur við sær 1 tíma til próvdøming og vegleiðing. Tvs. VP=1.

*Annað undirvísingararbeiði (AU)*

Her verður mett at annað undirvísingararbeiði økir um arbeiðsbyrðuna við 10%. Tvs. AU=0,1.

*Effektiv arbeiðstíð (E)*
Her verður mett at effektiva arbeiðstíðin er 90%. Korrigerast skal sostatt fyri 10%. Tvs. E=0,1.

Við hesum hugsanum gerst talan um at faktorurin fyri MA verður 6,11:

$$F_{MA} = \frac{(1 + FT + VP) \cdot (1 + AU)}{(1 - E)} = \frac{(1 + 3 + 1) \cdot (1 + 0{,}1)}{(1 - 0{,}1)} = 6{,}11$$

Faktorurin fyri BA verður 4,89:

$$F_{BA} = \frac{(1 + FT + VP) \cdot (1 + AU)}{(1 - E)} = \frac{(1 + 2 + 1) \cdot (1 + 0{,}1)}{(1 - 0{,}1)} = 4{,}89$$

**Gransking**
Eisini má takast hædd fyri, hvussu granskingargrundað hvør undirvísing er. Til hetta verður parameturin g brúktur. Hesin sigur, hvssu stórur prosentpartur av undirvísarunum granska. Tvs.:

$$\text{g} = \frac{Tal\ av\ undirvísarum\ sum\ granska}{Samlað\ tal\ av\ undirvísarum\ \text{á}\ útbúgvingini}$$

Verður gransking tikin við, fæst samlaða tímatalið á útbúgvingini soleiðis:

$$Samlað\ tal\ av\ tímum = UT \cdot F \cdot (1 + g)$$

Har g vísir, hvussu stórur partur av undirvísarunum granska hálva tíð.

**Kostnaður av sjálvari útbúgvingini**
Fyri at finna fram til kostnaðin av útbúgvingini má fyrst finnast fram til talið av fulltíðar starvsfólki, sum skulu til at dekka samlaða tímatalið. Her verður tikið hædd fyri, at eitt ársverk, ella ársnormur, er 1651 tímar. Tal av vísindastarvsfólki kann sostatt finnast sum:

$$Vísindastarvsfólk = \frac{UT \cdot F \cdot (1 + g)}{1651}$$

Við at falda við miðalkostnaði fyri hvørt starvsfólk kann kostnaðurin finnast sum:

$$Lønarkostnaður\ vísindastarvsfólk = \frac{UT \cdot F \cdot (1 + g)}{1651} \cdot LV$$

Har LV er miðal lønarkostnaður av einum vísindastarvsfólki.

**Samlaði myndilin fyri vísindapartin**
Samlaði myndilin fyri vísindapartin á hvørjari útbúgving verður sostatt:

$$Lønarkostnaður\ av\ \text{útbúgving}\ A\ \text{í}\ 2019 = \frac{P_A^{2019} \cdot ST_A^{2019} \cdot TS_A^{2019} \cdot F \cdot \left(1 + g_A^{2019}\right) \cdot LV^{2019}}{1651}$$

Har P er parturin, sum Setrið rindar av útbúgving A, ST er talið av skeiðum árliga, og TS er tímatalið á hvørjum skeiði á útbúgving A. F er ein faktor, sum er 6,11, um A er ein MA-útbúgving, og 4,89, um talan er um BA-útbúgving. g er granskingarparturin á útbúgving A. LV er miðallønin fyri vísindafólk á Setrinum samanlagt, og 1651 er ársnormurin fyri fulltíðar sett.

# Fíggjarstýring og játtanarviðurskifti

## Fíggjarlógartilgongd

Mentamálaráðið peikar á, í orðingini av arbeiðssetninginum, at stóri trupulleikin er, at játtanin ikki verður hildin, og at hetta er afturvendandi trupulleikin. Fyri at greina henda spurningin, hevur formaðurin í nevndini gjøgnumgingið journaliserað skjøl fyri fíggjarlógina fyri 2017 og 2018, og meiri ítøkiliga er hugt eftir fíggjarlógargongdini fyri 2017. Í fylgiskjali 3 eru fylgiskjølini sett upp. Skjølini eru í journalini á Setrinum og journalini í Mentamálaráðnum. Somuleiðis hevur formaðurin mett um samskiftið millum ráðið og Setrið meira generelt.

Niðanfyri verður víst til skjalanumrini, sum standa í yvirlitinum í fylgiskjali 3.

Í fylgiskjali 4 hevur Mentamálaráðið greinað, hvussu mannagongdirnar eru í ráðnum

Formaðurin í arbeiðsbólkinum staðfestur hesi viðurskifti:

### Samarbeiðið millum ráðið og Setrið er merkt av strongd

Tað er ringt at koma uttanum veruleikan, at rektarin og Mentamálaráðið hava alment verið í orðadrátti um játtanarviðurskifti. At ein almennur stjóri er í almennum orðadrátti við arbeiðsgevaran skapar ikki konstruktivan dialog.

Hóast alt er játtanin til Setrið vaksin munandi seinastu árini og er millum tær játtanirnar (um smærri játtanir verða tiknar frá), sum er vaksin mest[12]. Tí er tað skilligt, at Mentamálaráðið er ørkymlað, tí í stóra samanhanginum skal Mentamálaráðið berjast fyri hesum vøkstri, tí hesin vøksturin er nógv hægri enn vøksturin á fíggjarlógini sama tíðarskeið[13].

Tað kemur eisini til sjóndar í samskiftinum, at báðir partar eru ørkymlaðir. Setrið sigur, at Mentamálaráðið ikki lurtar, og Mentamálaráðið sigur, at tey vanta neyðugar grundgevingar fyri játtanini (Fylgiskjal 16). Hetta við tølum og grundgevingum kemur eisini til sjóndar aðrastaðni. Setrið verður biðið um ymsar útskriftir yvir virksemið. Eisini hevur ráðið fleiri ferðir fingurin uppi og staðfestir, at játtanin skal halda. Hetta vita allir stovnsleiðarar, tí hetta er ein partur av roknskapargóðkenningargrundarlagnum.

Allir stovnar vilja meira, enn teir fáa játtað. Skuldi tingið játtað øll ynski frá stovnum og lokal politikarum í breiðum týdningi, var ógjørligt at tálma almennu útreiðslurnar. Tí verður arbeitt við árligum kørmum, sum allýsa útreiðslustigið á fíggjarlógini. Hetta ger, at tað er neyðugt við beinhørðum raðfestingum frá landsstýrinum, sum so aftur viðførir, at ráðini ikki fáa tað at ráða yvir, sum tey

[12] Sí leinkju í LKS
https://lks.gjaldstovan.gov.fo/lks/gl9.pl?ar=2018&fso=ja&ixar=1&jslag=1&listi=ar&minar=2014&niv=hovuds&pagesize=2000&rd=fld
[13]Sí leinkju í LKS
https://lks.gjaldstovan.gov.fo/lks/gl9.pl?ar=2018&ixar=1&jslag=1&listi=ar&minar=2014&niv=jslag&pagesize=2000&rd=fld

ynskja sær. Hetta skapar serliga trupulleikar, tá ið stovnar skulu vaksa um virksemið, júst sum vit síggja her. Setrið fær ikki tað, sum Setrið ynskir. Setrið fær heldur ikki tað, sum Mentamálaráðið ynskir, tí tað er ikki pláss fyri hesum innan karmarnar frá landsstýrinum.

## Vøksturin ikki nóg væl kjølfestur í politisku skipanini

Vøksturin er ikki kjølfestur í eini breiðari politiskari avtalu, har tað ítøkiligt er gjørd ein vakstrarætlan við tilhoyrandi fíggjarætlan. Tað tykist sum alt byggir á ov veikar politiskar "hensigtserkleringar". Tí er uppgávan hjá Mentamálaráðnum, ár undan ári at økja um vøksturin til Setrið nógv meira enn aðrar játtanir, sera trupul.

**Mælt verður til, at tað verður gjørd ein vakstrarætlan fyri Setrið, har øll týðandi viðurskifti verða tikin við og lýst búskaparliga, og at henda ætlan verður breitt politiskt kjølfest.**

## Góðkenning av nýggjum virksemi

Mentamálaráðið góðkennir nýtt (nýggjar útbúgvingar), men tað er ikki tað sama sum, at játtanin fyri alla framtíð veksur við t.d. 3 mio. kr. Myndilin vísir, at tað eru so nógvir parametrar, sum eru avgerandi fyri játtanina, at játtanarspurningurin er ein nýggj viðgerð á hvørjum ári.

## Brúk av ætlanarárunum

Langtíðarætlan í viðmerkingunum til fíggjarlóg verður ikki reglufast nýtt til tað, sum hon er ætlað til. Nevniliga við at vísa, hvat vit kunnu rokna við í framtíðini. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina fyri 2016 eru ætlanartølini fyri t.d. 2018 mett til 82 mio. kr. hóast tosað var um eitt nógv hægri tal. Tað verður samskift um nógv ymisk ætlanartøl, har øll hava sínar ymisku fyritreytir.

Tað gevur ikki meining at framskriva status quo í ætlanartølunum, um virksemið í veruleikanum fer at vaksa. Tað er misvísandi arbeiði.

**Sundurgreinað ætlan**

7.23.6.16. 4.7.23.6.16.2

| Tús. kr. | 2013 R | 2014 R | 2015 J | **2016** F | 2017 Æ | 2018 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 69.724 | 74.474 | 76.984 | 82.535 | 82.535 | 82.535 |
| Útreiðslur | 81.297 | 86.155 | 87.184 | 92.235 | 92.235 | 92.235 |
| Inntøkur | 11.573 | 11.682 | 10.200 | 9.700 | 9.700 | 9.700 |

20. Fróðskaparsetur Føroya

*Mynd 16. Ætlanartøl á fíggjarlógini fyri 2016. Tey eru framskrivað við støði í 2016, hóast virksemið økist*

**Mælt verður til, at Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið semjast um, hvussu ætlanartølini skulu verða brúkt.**

## Tað verður brúkt nógv orka upp á játtanartilgongdina

Frá øllum teldupostunum – sí fylgiskjal 3 – sæst, at tað verður brúkt ótrúliga stór orka upp á samskifti. Samskiftið dettur burtur viðhvørt frá Mentamálaráðsins síðu, óivað tí at hildið verður, at Setrið skal halda seg til tað, sum er meldað út, og kanska eisini tí fólkini í Stýrisdeildini hava nógv um at vera.

Eitt annað viðurskifti, sum kann skapa trupulleikar, er, at tað eru nógv fólk í Mentamálaráðnum, sum eru inn yvir uppgávurnar. Tað eru fleiri persónar, sum eru inni yvir útbúgvingarvirksemið, meðan tað er Stýrisdeildin, sum ábyrgist fyri búskapin á Setrinum. Hetta, at rektarin skal samskifta við so nógvar persónar í Mentamálaráðnum, ger tingini meira innviklað og inneffektiv. Hetta er ein klassiskur trupulleiki, tá ið talan er um vitanartungar stovnar, at tað eru ov nógvir samskiftisvegir, og at tað er tørvur á eini organisatión við eini “single point of contact”. T.d. kundi samskiftispersónurin, sum mælt varð til í partinum, Hvussu kann myndilin verða brúktur í dialoginum við Mentamálaráðið, verið ein slíkur samskiftispersónur, sum formidlaði tingini víðari og fylgdi upp á øll viðurskifti.

**Mælt verður til greiðari kommando- og samskiftislinjum við Setrið. Tað átti at verið ein samskiftisperónur, sum var bindiliður millum Setrið og Ráðið.**

## Vantandi standardisering í játtanararbeiðinum

Samskiftið er merkt av vantandi standardisering, hvat viðvíkir uppgerðum, virksemisdátum, mannagongdum og fyritreytum.

Dømi: Í spurninginum um eykajáttan eru fleiri tøl á lofti.

| | | |
|---|---|---|
| fylgiskjal 10a | 4,0 mió. kr. | |
| fylgiskjal 13 | 1,6 - | |
| fylgiskjal 14 | 2,5 - | |
| uppskot til eykajáttanarlóg | 2,2 - | (datt burtur) |

Samskiftið er merkt av, at partarnir sita ov langt frá hvørjum øðrum. Henda fjarstøðan ger tað sera trupult at skapa sær eitt veruligt yvirlit yvir støðuna.

**Mælt verður eisini til, at samskiftið verður meira formaliserað og standardiserað m.a. við nýggja ráðleggingarmyndlinum fyri Setrið. Hetta hevði kvalifiserað dialogin munandi.**

Setrið og Mentamálaráðið eru farin undir fastar mánaðarfundir við fastari dagsskrá. Hetta er jaligt.

## Eitt sindur ivingarsamt hvat ráðið og Setrið leggja í játtanargóðkenningina




| Stovnsnummar | Heiti | 01-2017 | 02-2017 | 03-2017 | 04-2017 | 05-2017 | 06-2017 | 07-2017 | 08-2017 | 09-2017 | 10-2017 | 11-2017 | 12-2017 | 13..16 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 115820 | Fólkaskúlin K | 26.394 | 27.300 | 23.621 | 31.219 | 27.425 | 21.129 | 24.343 | 25.813 | 26.345 | 24.051 | 28.112 | 23.645 | 2.534 |
| 134010 | Skúladepil við Marknagil K | 3.480 | 7.199 | 12.037 | 5.164 | 9.923 | 17.550 | 4.773 | 5.396 | 15.451 | 8.772 | 7.581 | 8.433 | 11.861 |
| 154560 | Glasir, Skúladepilin í Marknagili K | 8.635 | 9.227 | 10.200 | 11.762 | 10.293 | 13.111 | 6.442 | 8.965 | 8.399 | 8.892 | 9.437 | 10.816 | -1.187 |
| 119001 | Stuðul til lesandi, stuðulsveitingar K | 10.720 | 11.027 | 11.078 | 10.002 | 9.109 | 9.957 | 979 | 8.685 | 9.896 | 10.174 | 9.968 | 8.370 | 1.893 |
| 118420 | Fróðskaparsetur Føroya K | 6.660 | 7.417 | 7.667 | 8.387 | 7.532 | 6.920 | 7.430 | 6.253 | 6.752 | 6.930 | 7.166 | 6.915 | -105 |

*Mynd 17. Roknskapargóðkenningin av Setrinum 2017 í Leiðslukunningarskipanini*

Setrið boðar frá í skjali 13,14 og 15 (fylgiskjal 3), at játtanin er ov lítil og tekur fyrivarni. Parallelt arbeiðir ráðið við eini eykajáttan, sum fall burtur á ólavsøkutingsetuni. Setrið boðar frá í Roknskapargóðkenningarskipanini - fyrstu ferð fyri februar 2017, sum varð góðkendur 3. apríl 2017 - har rektarin tekur fyrivarni. Ráðið tekur ikki fyrivarni yvirfyri Fíggjarmálaráðnum.

Nú endaði málið tíbetur væl, men endaði Setrið við einum stórum yvirtrekki, kundi hetta verið eitt rótut mál.

**Mælt verður til, at tað eru greiðar mannagongdir í roknskapargóðkenningini, serliga´tá ið roknað verður við eini eykajáttan.**

## Endaúrslitið av fíggjarárinum 2017

Nógv tøl vóru umrødd bæði í at gera fíggjarlóg og í útmeldingunum um tørv fyri eykajáttan. Bert 900 túsund vóru til endans játtaðar. Setrið var rættiliga avgjørt í útmeldingunum, hvat fór at henda, um tey ikki fingu 2,4 mió kr. Endaúrslitið var,




| Høvuðskonta | Heiti | Roknskapur 2017 | Játtan 2017 | Avlop 2017 | Roknskapur 2016 | Játtan 2016 | Avlop 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23201 | Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 311.930.805 | 311.670.000 | -0% | 304.288.290 | 304.267.000 | -0% |
| 23305 | Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarj.) | 210.027.133 | 213.880.000 | 2% | 211.219.647 | 212.711.000 | 1% |
| 23309 | Skúladepil við Marknagil (Løguj.) | 117.620.143 | 148.890.000 | 21% | 100.272.737 | 100.273.000 | 0% |
| 23704 | Lestrarstuðul (Lógarb. j.) | 124.238.792 | 127.511.000 | 3% | 123.508.729 | 123.312.000 | -0% |
| 23616 | Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | 88.108.335 | 88.086.000 | -0% | 85.102.905 | 85.035.000 | -0% |
| 23202 | Sernám (Rakstrarj.) | 72.925.272 | 72.867.000 | -0% | 72.127.746 | 72.115.000 | -0% |

*Mynd 18 Endaligi játtanarroknskapurin fyri 2017*

at Setrið greiddi at halda játtanina, tí Setrið setti nøkur sparitiltøk í verk í síðsta partinum av árinum, tí tingið játtaði 900 túsund eyka, og tí at Mentamálaráðið brúkti góðar 500 túsund kr. minni av eini undirkontu, sum ráðið hevði ræði á, og sum lá undir høvuðskontuni fyri Setrið.

## Vantandi upplýsingar um virksemið hjá Setrinum á fíggjarlógini

Útreiðslurnar til Setrið vaksa (sí Mynd 2) í tíðarskeiðinum 2013 til 2017 frá 72 mió. kr. til 93 mió. kr. T.v.s. 5 mió. kr. um árið. Tað er eingin frágreiðing til hesa økingina í viðmerkingunum til fíggjarlóg. Tað nærmasta er tað, sum er markað við gulum niðanfyri, at talið av lesandi hækkar við 100 um árið. Meginregluliga nýtist tað ikki at skapa ein útreiðsluvøkstur í hesum flokkinum, tí sum vit hava staðfest aðrastaðni í frágreiðingini, er tað ikki næmingar, men útbúgvingar, sum skapa ein útreiðsluvøkstur. Tí vantar eitt amboð at miðla virksemið hjá Setrinum yvirfyri tinginum.

7.23.6.16. 4.7.23.6.16.3

| | | 2014 | 2015 | 2016 | **2017** | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | R | R | J | **F** | Æ | Æ |
| **A:: Høvuðsendamál (netto) (1.000 kr.)** | | **77.995** | **80.608** | **84.515** | **89.166** | **89.166** | **89.166** |
| | 1. Leiðsla, hjálparvirks., ikki flokksbýtt virks. | 17.108 | 17.831 | 17.715 | 17.833 | 17.833 | 17.833 |
| | 2. Gransking (íroknað savnsuppg.) og frálæra | 60.887 | 62.777 | 66.800 | 71.333 | 71.333 | 71.333 |
| **B:: Virksemi (tal)** | | | | | | | |
| | 2. Gransking og frálæra (tal av lesandi) | 750 | 850 | 950 | 1.050 | 1.120 | 1.120 |

*Mynd 19. Upplýsingar um virksemið hjá Setrinum á fíggjarlógini*

Mentamálaráðið ynskir framyvir fíggjarætlanina hjá Setrinum sett upp nøkulunda eftir meginreglum niðanfyri.

**Høvuðsendamál (1.000 kr.)**
Her verður virksemið lýst í krónum. Skilt verður ímillum undirvísingarvirksemi øðrumegin, og fyrisiting og leiðslu hinumegin. Høvuðsuppgávan á Setrinum er sambært lógini at "inna gransking og veita frálæru". Viðkomandi er tí, at hetta virksemið verður lýst í fíggjarlógini. Eg mæli tí til hesa greining:

1) Fyrisiting og leiðsla
2) Undirvísing
3) Gransking

**B: Virksemi (tal):**
Her síggja vit tal í mun til krónur.:

a. Føroyamálsdeildin
b. Námsvísindadeildin
c. Náttúruvísindadeildin
d. Sjúkrarøktarfrøðideildin
e. Søgu- og samfelagsdeildin

**C: Eindarkostnaður (kr.)**
Her verður lutfallið millum høvuðsendamál (kr.) og virksemi (tal) greinað.

1) Fyrisiting og leiðsla (kostnaður fyri hvønn næming)
2) Undirvísing (kostnaður fyri hvønn næming)
3) Kostnaður fyri hvønn næming tilsamans

Her eru ávísar justeringar, sum skulu verða gjørdar í mun til ynskini hjá Mentamálaráðnum í mun til gjøgnumgongdina av Ráðleggingarmyndli Setursins.

**Mælt verður til, at krøvini til uppsetingina av virksemisupplýsingum á fíggjarlóg sampakka við Ráðleggingarmyndil Setursins, og at tað longu fyri fíggjarlógararbeiðið fyri 2019 setur viðmerkingarnar til fíggjarætlanina upp eftir meginreglunum omanfyri.**

# Innanvirkis fíggjarstýring á Setrinum

Fyritreytin fyri, at ráðleggingarmyndil Setursins kemur at virka eftir endamálinum, er at tað er ein siðvenja, at deildirnar ráðleggja sjálvar og stýra eftir innanhýsis búskettum. Sum greitt aðrastaðni frá, leggur myndilin upp til, at deildin fær eina ávísa tímapulju, sum deildin skal ætla eftir. Gjøgnumgongdin niðanfyri lýsir, um deildirnar hava eina mentan at fyrisita inanvirkis fíggjarstýring. Talan er bara um eina lýsing av búskettstýringini. Hvat fer fram á persónsstigi er ikki greinað her.

## Hvussu verður arbeitt internt við fíggjarlógaruppskot

Henda lýsingin er gjørd útfrá samrøðum og skjølum, sum lógu sum grundarlag fyri 2017 og 2018. Tá ið fíggjarlógaruppskotið verður gjørt, biður fíggjarleiðarin deildirnar um at leggja lønarbúskett. Deildirnar leggja búskettini útfrá longu gongdsettum virksemi og við støði í ætlaðum virksemi, t.d. nýggjum útbúgvingum. Ætlað virksemi verður rópt raðfestingar. T.v.s. at deildirnar longu taka støðu til deildarbúskettini fyri komandi ár. T.d. fyri 2017 gav rektarin fíggjarleiðaranum boð um at fara i gongd við búsketteringina fyri komandi ár í februar 2016.

Í lønarbúskettinum verða fastar lønir framskrivaðar íroknað ætlaðar setanir. Annars er einasti variabul leysar lønir. Stýrt verður tætt upp á at halda játtanina til leysar lønir. Sum greitt frá aðrastaðni er hetta ein stórur postur í roknskapinum.

## Hvussu verður fíggjarlógin verksett á stovninum

Tá ið fíggjarlógin er samtykt, fáa deildirnar boð um at ráðleggja við støði í nýggjum fyritreytum. Deildarbúskettini skulu konsoliderað geva játtanina til stovnin.

Deildarbúskettini fyri 2018 geva tilsamans játtanina, og heldur bæði stjórin og fíggjarleiðarin, at játtanin fer at halda. Men lagt skal verða afturat, at el, hiti og vask av leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum er ikki tikið við í búskettið. Mentamálaráðið hevur boðað frá, at ráðið vil útvega hesar pengarnar. Um so er, heldur játtanin í ár, um ikki nakað óvæntað hendir.

Umframt hetta hevur deildin ábyrgd av einum parti av rakstrarútreiðslunum, sum t.d. ferðing og skrivstovuútreiðslur.

Deildirnar fáa hvør sítt rakstrarbúskett, sum er lagt inn í Leiðslukunningarskipanina. Dekanarnir skulu góðkenna mánaðarroknskapin yvirfyri fíggjarleiðaranum.

Niðurstøða um innanhýsis fíggjarstýringina á Setrinum er, at miðfirraða fíggjarstýringin tykist at virka á Setrinum. Tað tykist, sum at deildirnar eru jaligar at taka móti øktu ábyrgdini, sum fylgir við øktu miðfirringini av ráðleggingini. So fyritreytirnar fyri verksetingini av Ráðleggingarmyndli Setursins eru til staðar.

## Próvbókin

Próvbókin er grundarlagið undir at skráseta virksemið á Setrinum. Fak og skeið verða skrásett standardiserað í Próvbókini. Hvørt skeiðið verður skrásett við talinum av ECTS. Hvør lesandi verður árliga knýtt til eitt ávíst tal av skeiðum. Próvbókin heldur soleiðis skil á, hvussu nógv fak, og harvið ECTS, tú stendur tilmeldaður til um árið, og hvussu nógv skeið tú bestendur um árið. Próvbókin kann geva upplýsingar um lestrarvirkni, fulltíðarlesandi o.t. Próvbókin er grundarlagið undir ymsum útrokningum, sum hvussu nógvir ársnæmingar verða framleiddir á Setrinum um árið. Próvbókin sigur soleiðis eisini nakað um effektivitet, góðsku og framleiðslu.

Øll próvúrslit  verða skrásett í Próvbókini, tí inniheldur Próvbókin eisini sera kritiskar persónsdátur.

Próvbókin er ikki ein dynamisk skrá, sum broytist frá degi til dags, tí at tað eru avmarkingar í lógargrundarlagnum fyri, hvørji tiltøk sum Setrið kann seta í verk fyri ein persón, sum stendur innskrivaður, men sum ikki er lestrarvirkin.

Í hesum arbeiðinum hevur verið sett fokus á Próvbókina, tí tað hava verið so stór frávik millum skrásetingarnar hjá Studna um talið av næmingum, sum fáa studning, og talið av lestrarvirknum í Próvbókini. Orsøkin til hesi frávik verða viðgjørd seinni.

Men bara tað, at tað verður sáddur ivi um eina slíka skrá, er orsøk til at stramma allar mannagongdir rundanum skipanina.

Fyri at koyra skráirnar upp móti hvørji aðrari, hevur ein trupulleiki verið, at P-talið ikki hevur ligið inni í Próvbókini. Tvs. at Setrið ikki ordiliga hevur kunnað tryggjað, at tað eru rættir persónar, sum til eina og hvørja tið liggja inni í skipani. Sigast skal tó, at hetta ikki hevur ikki verið ein trupulleiki. Hetta arbeiðið við P-talinum hevur verið partur av hesi verkætlanini og er komið upp á pláss. Henda verkætlanin hevur eisini víst, at tað er neyðugt við meira hondfastum mannagongdum rundanum Próvbókina, bæði við at nakrar av skrásetingunum eru meira dagførdar, og at tað verður ein kravd innskriving við byrjanini av hvørjum lestrarári, so at fólk, sum kanska langt síðan eru farin aðrar leiðir, ikki verða tald við í tølunum.

**Mælt verður til, at Próvbókin verður ein meira sentral skipan hjá deildunum og hjá ráðnum.**

Tað átti at verið ein rapporteringspartur, sum var nógv lættari atkomiligur, enn hann er í dag. Upplýsingar úr Próvbókini áttu at verið ein partur av skrivaraborðinum hjá teimum, sum hava leiðandi funktiónir á Setrinum, og áttu nakrar av rapportunum at verið partur av  leiðslutilgongdini. M.a. spill (fráfall) og góðska (karakterir) áttu at verið fokusøki tvørtur um alla organisatiónina.

**Mælt verður til, at Próvbókin er ein partur av mánaðarliga innaneftirlitinum, tí hon er ein so sentral skrá fyri at reka útbúgvingarnar á Setrinum.**

Tað átti at verið ein kekklisti, sum mánaðarliga tryggjaði skrásetingarnar í Próvbókini.

**Fyri at tað ikki verður sáddur ivi um Próvbókina, verður mælt til, at leiðslan á Setrinum letur skipanina og mannagongdirnar rundanum skipanina skoða av eksternum grannskoðara.**

Tað eigur at verða sannað, at eingin óviðkomandi yvirhøvir sleppur fram at dátunum í skipanini. Hvørki at lesa ella broyta, og at tað verður sannað, at skrásetingarnar eru rættar.

**Mælt verður til, at KT-loysnin Próvbókin verður uppstigað. Støða eigur at verða tikin til, um Mentamálaráðið eigur at vera skipanareigari av Próvbókini.**

Próvbókin er eftirhondini ein gomul loysn og hevði trongt til eina uppstigan, m.a. fyri at gera hana meira trygga, gera hana meira interaktiva við aðrar loysnir sum Heldina og meira flexibla við rapporteringspartinum.

## Reglur o.t. fyri arbeiðstíð

Á øðrum undirvísingarstovnum eru sentralar ásetingar um tað nógva av undirvísingarvirkseminum. Í mun til hetta eru ikki so nógvar ásetingar á Setrinum. Hetta hevur sínar fyrimunir, tí tað skapar nógv størri frælsi at leiða og fordeila arbeiðið, tí eingin persónur hevur somu eginleikar og ynski. Hetta hevur eisini sínar avbjóðingar, t.d. at honoreringin fyri sama stig av arbeiði millum deildir og persónar er ymisk, og tí kann hetta skapa ónøgd.

Sum vit sóu tað undir greiningini av myndlinum, so eru nakrar viðtøkur rundanum, hvat tíð hesi ymsu tingini skulu taka. Tá ið ein slík avgerð er tikin, er ikki bara sum at siga tað at broyta hana aftur t.d.:

- hvussu stórur skal granskingarparturin vera av arbeiðstíðini
- hvussu nógv skal vegleiðing av eini kandidatuppgávu telja í samsýning

Rektarin hevur orðað eitt uppskot til normering av arbeiðstíð, sum byggir á fundir við dekanar og starvsfólk. Skjalið er viðlagt sum fylgiskjal 5. Í rundskrivinum sigur rektarin, at tað er tørvur á at skipa og áseta tíðarnýtsluna fyri undirvísingaruppgávur neyvari og á tann hátt at geva starvsfólkum og leiðslu eitt betri amboð til at leggja útbúgvingarvirksemið til rættis. Umframt at slíkt amboð hevur týdning í mun til fíggjarstýring, so er eisini eitt endamál at skapa greidleika, gjøgnumskygni og rættvísi viðvíkjandi, hvussu arbeiðsuppgávur verða býttar. Tá útbúgvingar- og undirvísingararbeiðið er neyvari avtalað og skjalfest, so verða umstøðurnar at leggja granskingararbeiðið til rættis greiðari.

Skipanin verður sett í verk við byrjan av lestrarárinum 2017/2018, og skal hon eftirmetast og tillagast regluliga.

Setrið kennir best uppgávuøkið, og er tí best at meta um hetta, men tað er altíð rætt at venda slík mál við ein uttanhýsis myndugleika, tí tað kunnu vera atlit, sum ikki er hugsað um. Talan um stórar avgerðir, sum í síðsta enda kunnu kosta Landskassanum nógvar pengar, og sum Mentamálaráðið skal útvega játtan til.

**Mælt verður til, at allar generellar innanhýsis støðutakanir á lønarøkinum verða formliga tiknar upp við Mentamálaráðið.**

## Skráseting av arbeiðstíð

*Roknskaparkunngerðin sigur í §5 Stk. 4. Stovnsleiðarin skal skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítið o.tíl. er á stovninum, so lønarútgjaldingarnar eru rættar.*

Sum nú er, verður arbeiðstíðin ikki skrásett, hóast tað er eitt krav sambært roknskaparkunngerðini.

Hetta merkir ikki at undirvísarar og granskarar skulu fremja tíðar- og aktivitetsskráseting. Men tað skal verða funnin ein loysn, har tað verður sannað, at tað er ein rættur samanhangur millum lønarkrónur og brúki av lønartímum.

Sambært rundskrivinum í fylgiskjal 5 avtalar dekanurin við tann einkulta arbeiðstíðina á deildini. Henda avtalan er grundarlagið undir avtalaðu arbeiðstíðini. Dekanurin heldur skil á hesum.

Tað, at hesi viðurskifti verða skipað, fer at gera tað gjørligt at fylgja meira kvalifiserað upp á parametrarnar í Ráðleggingarmyndli Setursins. T.d. hvussu nógv tíð verður veruliga brúkt til:

- gransking,
- fyrireiking,
- menning o.t.
- próvdøming
- fyrisiting

Deildirnar – ikki persónarnir – eiga at skráseta tíðina, sum í myndlinum er kategoriserað sum tíð til starvsfólkaviðurskifti, eftir einum yvirskipaðum leisti.

Sum partur av arbeiðstíðarskrásetingini er skráseting av sjúku og hildnari frítíð. Júst hesin parturin við at hava eina sentrala skrásetan av frítíð er avgerandi, tí fleiri á Setrinum fáa útgoldið 6. fríviku. Um eingin skráseting er av frítíð, kann roknskaparhaldið ikki sanna, at hetta er rætt.

Sum skilst er Setrið í holt við at innføra eina sentrala skrásetingarskipan av hildnari frítíð og sjúku.

Fólk í fyrisitingini eiga at skráseta sína arbeiðstíð, sum vanligt er á øðrum stovnum.

**Mælt verður til, at Setrið ger leiðureglur fyri, hvussu hóskandi skráseting av arbeiðstíð verður framd, og mannagongd fyri, hvussu fylgt verður upp á parametrarnar í myndlinum.**

## Innaneftirlit

Sambært roknskaparkunngerðini skulu stovnarnir verkseta eitt effektivt innaneftirlit. Í nýggja roknskaparrundskrivinum um at gera roknskaparreglugerð fyri stovnin verður tað eitt krav, at stovnurin skal verkseta eitt virkið innaneftirlit, sum byggir á eina váðagreining av virkseminum á stovninum. Eitt virkið innaneftirlit skal byggja á væl greinaðar mannagongdir sum mánaðarligar og vikuligar kekklistar.

Henda gjøgnumgongdin vísir, at tað eigur at verða verksett eitt virkið innaneftirlit við:

- Øllum skrásetingum og mannagongdum rundanum Próvbókina
- Hvussu myndilin verður brúktur, mentur og versiónsstýringar. Hetta er avgerandi fyri at skapa álit á myndilin. Innaneftirlitið eigur eisini at meta, um parametrarnir eru rímiligir, við at tað verður kravt ein ella onnur minimumsskráseting úti á deildunum
- Mánaðarlig uppfylging av internum búskettum
- Roknskaparspurningum, t.d eru lønir steðgaðar, er alt avgreitt, er frítíð skrásett, er sjúka skrásett

Roknskapardeildin hevur ein form fyri kekklistar, sum bygt kann verða víðari á. **Mælt verður til, at hesir verða formliga kvitteraðir.**

**Mælt verður til, at tað verður formulerað og verksett eitt virkið innaneftirlit á Setrinum, sum vísir beinleiðis til fyrisitingarstjóran. Tað eigur eksplisitt at verða kvitterað fyri eftirlitunum.**

## Fíggjarstýring og myndilin

Nýggjar fíggjarstýringarloysnir krevja broytta atferð. Ofta síggja vit hetta í skrásetingararbeiðinum, at dátur ikki ordiliga eru skrásettar í mun til, hvat nýggjar loysnir leggja upp til og krevja. Vit sóu hetta m.a. undir partinum við Próvbókini. Vit síggja hetta eisini við skrásetingum í BSL.

Tað má vera ein greið skráseting av, hvør er VIP, og hvør er TAP. Tað skal ikki vera neyðugt at meta um, hvørt hasin og hasin nú telja við ella ikki. Hetta skapar misálit. Hetta vil eisini gera tað greiðari í árligu uppfylgingini av myndlinum, at hesi viðurskiftini eru greið.

Vit síggja tað eisini undir ársverksútrokningunum í BSL og í myndlasamanhangi. T.d. roknar Leiðslukunningarskipanin ov lágt ársverk, tá ið umræður leysar lønartímar og roknar als ikki ársverk, tá ið talan er um praktikksamsýningar.

**Mælt verður til, at tað verður gjørd ein ætlan fyri tilrættisleggina av skrásetingum, so tað er lættari at fylgja upp á myndilin**

# Greining av muni millum hagtøl hjá Studna og Fróðskaparsetrinum

Spurningurin her er, hvussu munurin kann greinast millum talið av lesandi á Fróðskaparsetrinum og talið av teimum, sum fáa útbúgvingarstuðul frá Studna.

## Samanbering millum tøl frá Studna og Fróðskaparsetrinum

Studni gjørdi eina koyring 31.3.2018, sum vísir, hvørji lesandi á Fróðskaparsetrinum tá fingu studning. Tilsamans fingu 604 fólk studning. Eisini varð koyring gjørd úr Próvbók (17.4.2018), sum vísti, at 938 virkin lesandi vóru á Fróðskaparsetrinum. Eisini vóru 87 virkin stakgreinalesandi, men tey eru ikki tikin við her (og tey hava heldur ikki rætt til studning).

| | Studni | Próvbók | Munur | Hvussu nógv fáa stuðul í % |
|---|---|---|---|---|
| Føroyamálsdeildin (FMD) | 25 | 42 | 17 | 59,5% |
| Námsvísindadeildin (NÁD) | 275 | 298 | 23 | 92,2% |
| Náttúruvísindadeildin (NVD) | 60 | 105 | 45 | 57,1% |
| Søgu- og Samfelagsdeildin (SSD) | 152 | 298 | 146 | 51,0% |
| Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi (HSV) | 92 | 195 | 103 | 47.2% |
| **Samanlagt** | **604** | **938** | **334** | **64.4%** |

*Mynd 20. Yvirlit yvir virkin lesandi í Próvbókini og hvussu nógv standa at fáa Studning úr skipanini hjá Studna*

Av talvuni sæst, at nærum øll lesandi á Námsvísindadeilidini fáa studning (92.2%), meðan á hinum deildunum fáa bert millum 47,2% og 59,5% studning. Endamálið við hesi greiningini er so at finna útav, hvørji hesi 334 eru, sum ikki fáa studning frá Studna, men sum tó standa sum virkin í Próvbók.

## Lesandi, sum fáa studning, men sum IKKI standa at vera virkin í Próvbók

Tað fyrsta, sum gjørt varð, var at kanna, um nakar fær studning frá Studna, sum IKKI stendur at vera virkin í Próvbók. Hetta skuldi ikki komið fyri, men tó vísti tað seg, at tað talið er heili 64! Tað var sjálvandi týdningarmikið at kanna hetta nærri, og tíanbetur vísti tað seg, at høvuðsorsøkin til hetta talið er munurin millum, hvussu Studni og Setrið skráseta lesandi, sum antin eru í barnsburðarfarloyvi, ella sum taka skiftislestrarskeið uttanlands. Hesi lesandi varðveita sín stuðul, og tí verða tey tikin við í koyringini hjá Studna, meðan tey verða sett at vera óvirkin í Próvbók, og tí verða tey ikki tald við í koyringini hjá Setrinum. Sigast skal tó, at fyri 8 av teimum 64 hevði Setrið fráboðað Studna, at tey vóru givin á Setrinum, og tí átti stuðulin at verið steðgaður. Setrið sendi Studna hesi nøvn, og Studni boðaði frá, at sjálvt um hesi 8 stóðu á Studna-listanum, fingu tey 0 kr. í stuðuli. 19 av hesum 64 skulu kannast nærri, og verður hetta nú gjørt bæði av Studna og Setrinum.

Samanlagt merkir hetta, at faktiski munurin millum lesandi, sum fáa studning, og virkin lesandi á Setrinum gerst enn størri. Av teimum 938 virknu lesandi er talið,

sum fáa studning, ikki 604, men bert 540. Tað vil so siga, at vit skulu greina, hvørji **398** lesandi uttan studning eru (og ikki bert 334).

## Hvørjar útbúgvingar geva rætt til stuðul?

Tey 398 lesandi, sum standa at vera virkin lesandi í Próvbók, men sum ikki fáa studning frá Studna, eru býtt millum 36 ymiskar útbúgvingar, men bert 28 av hesum útbúgvingum geva rætt til stuðul frá Studna (sí talvu niðanfyri - her sæst m.a. ph.d.-verkætlanir, ískoytisútbúgvingar, diplomútbúgvingar o.a.). 181 lesandi eru á hesum ikki-stuðulsgevandi útbúgvingum, og tað vil siga, at eftir eru **217** lesandi, sum lesa á stuðulsgevandi útbúgvingum, men kortini ikki fáa studning.

| Útbúgvingar, sum geva rætt til stuðul | |
|---|---|
| B.A. í føroyskum | 2 |
| B.A. í søgu | 6 |
| B.A. í søgu (Smátjóðir og altjóðagerð) | 15 |
| B.Ed. (Bachelor of Education) og diplom í námsfrøðiligum arbeiði | 5 |
| B.Ed. (Bachelor of Education) og diplom í undirvísing (1.-10. flokk) | 6 |
| B.S.Sc. í samfelagsvísindum | 5 |
| B.S.Sc. í samfelagsvísindum (Politikki og umsiting) | 15 |
| B.S.Sc. í samfelagsvísindum (Sosialvísindi og samfelagsplanlegging) | 22 |
| B.S.Sc. í stjórnmálafrøði | 1 |
| B.Sc. í búskaparfrøði | 5 |
| B.Sc. í KT-verkfrøði | 24 |
| B.Sc. í lívfrøði | 3 |
| B.Sc. í mýlalívsvísindum | 1 |
| B.Sc. í orku- og umhvørvisverkfrøði | 2 |
| B.Sc. í orkuverkfrøði | 2 |
| B.Sc. í sjúkrarøktarfrøði | 9 |
| B.Sc. í vistfrøði | 2 |
| Hjánám í føroyskum | 4 |
| Hjánám í politikki og umsiting | 1 |
| Hjánám í samfelagsvísindi | 2 |
| Hjánám í søgu | 2 |
| M.A. í føroyskum | 8 |
| M.A. í løgfrøði | 42 |
| M.A. í søgu | 3 |
| M.S.Sc. í politikki og umsiting | 3 |
| M.S.Sc. í sosialvísindum og samfelagsplanlegging | 9 |
| M.S.Sc. in West Nordic Studies, Governance and Sustainable Management | 17 |
| MA í føroyskum bókmentum | 1 |
| **Samanlagt** | **217** |

| Útbúgvingar, sum IKKI geva rætt til stuðul | |
|---|---|
| Diplomnám í námsfrøðiligari leiðslu | 39 |
| Hjánám í støddfrøði | 9 |
| Ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði | 69 |
| M.A. í vegleiðing | 15 |
| M.Sc. í fólkaheilsu | 18 |
| M.Sc. í heilsuvísindi | 16 |
| Masterskeið í gudfrøði | 1 |
| Ph.D.-lestur | 14 |
| **Samanlagt** | **181** |

Næsta stigið í greiningini var at kanna hvønn einstakan av teimum 217 til tess at bólka tey neyvari. Tað vísti seg, at tey lesandi kunnu býtast í hesar 6 bólkarnar:

- **Bólkur A**: Fyrrnevndu ikki-stuðulsgevandi útbúgvingar.
- **Bólkur B**: Lesandi, sum hava lisið longri enn ta tíð, sum Studni gevur studning í, ella sum hava tikið aðra útbúgving fyrr og harvið hava uppbrúkt teirra "klipp".
- **Bólkur C**: Lesandi, sum ikki framleiða ECTS (null ECTS ella hava ikki verið til nakra próvtøku síðan 30-6-2015).

- **Bólkur D**: Lesandi, sum ikki fáa stuðul av ymiskum orsøkum: vinna ov nógvan pening við arbeiði, hava ikki søkt, fáa eftirútbúgvingarstuðul o.a. Vit kunnu ikki vita við vissu, hví tey ikki fáa studning.
- **Bólkur E**: Lesandi, sum eru virkin í ávísan mun, men sum ikki hava fingið nóg nógv ECTS til at fáa studning (kann vera, at tey fara upp í ov fáum próvtøkum ella ikki standa próvtøkurnar). Hesin bólkur umfatar eisini fólk, sum de facto bert taka stakskeið (í t.d. løgfrøði), men sum hava latið seg innskrivað sum fulltíðarlesandi fyri ikki at skula gjalda fyri stakgreinalestur.
- **Bólkur F**: Útlendingar, sum lesa á Setrinum, og sum ikki fáa studning.




*Mynd 21 Býtið av virknum lesandi í Próvbók, sum ikki fáa studning (samanlagt 398 lesandi)*

Sum sæst av myndini omanfyri, so var nógv tann størsti bólkurin (181 lesandi ella 45%) Bólkur A, tvs. lesandi sum lesa á ikki-stuðulsgevandi útbúgvingum. Vit vita, hví bólkarnir B, C, E og F (174 lesandi ella 42%) ikki fáa stuðul, men eftir stendur Bólkur D (43 lesandi ella 11%), har vit ikki kunnu siga við vissu, hví tey ikki fáa studning frá Studna. Hyggja vit nærri at hesum bólkinum síggja vit tó rættiliga nógv, sum vit (av tí vit liva í so lítlum samfelag) vita hava fast starv, og sum vit tí við rættiliga stórari vissu kunnu siga, at tey ikki hava rætt til stuðul, men tað er torført at greina øll í hesum bólkinum við bert at hyggja í Próvbók.

Bólkur C (69 lesandi ella 17%) er ein bólkur, sum ikki áttu at staðið í Próvbók sum virkin lesandi. Setrið er í ferð við at broyta mannagongdina soleiðis, at eftir hvørt lestrarhálvár, verða øll lesandi útskrivað, og tey skulu so aktivt innskriva seg sjálvi, tá næsta lestrarhálvár byrjar. Hetta fer væntandi at loysa trupulleikan við, at óvirkin lesandi verða "hangandi" í Próvbók. Hendan broytingin verður væntandi sett í verk longu í summar (2018).

Samanumtikið kan sigast, at munurin millum tey, sum fáa studning fra Studna og tey, sum standa sum virkin lesandi á Fróðskaparsetrinum (sambært Próvbók) hevur rættiliga greiðar orsøkir. Setrið kann gera meira fyri at rudda út í óvirknum lesandi, og eisini hevði verið ynskiligt, at tey, sum ikki framleiða nóg nógv ECTS,

verða fylgd upp við t.d. lestrarvegleiðing. Eisini átti Setrið at gjørt meira fyri at fyribyrgja, at fólk lata seg innskriva sum fulltíðarlesandi bert fyri at sleppa undan stakgreinagjaldi.

## Hvat nú?

Frágreiðingin hevur fleiri tilmæli, sum krevja eina skipaða viðgerð. Tað er eisini rættiliga avgerandi fyri brúkið av Ráðleggingarmyndli Setursins, sum bara er útgáva nr 1.0, at tað er ein skipað tilgongd fyri verksetingina og eftirmetingina av brúkinum av myndlinum.

**Mælt verður til, at verksetingin av myndlinum og teimum tilmælum, sum eru gjørd í hesi viðgerðini, verður skipað sum ein verkætlan.**

**Fylgiskjal 1 Arbeiðssetningur**

14.02.2018/PGH

# Búskettering og fíggjarlig stýring av Fróðskaparsetrinum

Orsøkin til, at farið verður undir hetta arbeiði, er, at Fróðskaparsetrið er í fíggjarligum trupulleikum, tí játtanin á fíggjarlógini ikki røkkur til tað ætlaða virksemi hjá stovninum. Hetta hevur verið ein afturvendandi trupulleiki í fleiri ár, har neyðugt hevur verið við eykajáttanum í fleiri umførum.

Frá politiskari síðu hava spurningarnir verið nógvir, og funnist hevur verið at eini manglandi fíggjarligari stýring á stovninum. Tað hevur ofta verið trupult hjá Mentamálaráðnum at fáa neyðuga innlitið í virksemi á Setrinum fyri at svara spurningunum, sum politiska skipanin hevur sett. Hetta hevur gjørt tað torført hjá landsstýriskvinnuni at umboða og verja stovnin.

Fróðskaparsetrið hevur verið í eini stórari menning seinnu árini síðani Fróðskaparsetrið bleiv ein samanlagdur stovnur av fyrrverandi Fróðskaparsetrinum, Læraraskúlanum og Sjúkrasystraskúlanum. Nógvar nýggjar útbúgvingar eru skipaðar á samanlagda stovninum, sum hevur havt sum eitt av sínum aðalmálum at vaksa um talið av lesandi og at átaka sær ein førandi leiklut í at fáa fólkavøkstur í Føroyum. Hetta hevur partvíst eydnast.

Men tað hava eisini verið trupulleikar í sambandi við, at ymsar stovnsmentanir og mannagongdir skulu fáast at virka saman innan fyri sama stovn. Tað hava eisini verið atfinningar um, at fokus í ov stóran mun hevur verið á útbúgvingarpartin á Setrinum, samstundis sum granskingarparturin hevur verið við skerdan lut. Vøksturin í tali av lesandi og útbúgvingum hevur eisini havt við sær, at tað hava verið hølistrupulleikar. Hetta er partvíst loyst við, at Setrið í næstum flytir inn í Sjóvinnuhúsið. Ein kampusbólkur er eisini settur at gera uppskot til, hvussu eitt framtíðar Fróðskaparsetur við øllum sínum fjølbroytta virksemi skal húsast.

Men ítøkiligi trupulleikin í løtuni er, at fíggjarliga hongur virksemið ikki saman, og neyðugt er við skerjingum í ætlaða virkseminum fyri at fáa játtanina at halda.

Tørvur er á eini skipan, sum lýsir samanhangin millum virksemið á stovninum og fíggjarligu gongdina í einum fleiri ára perspektivi. Neyðugt er at gera eina fleiri ára avtalu millum politisku skipanina og Fróðskaparsetrið, sum er grundað á ætlaða virksemi. (Í fíggjarlógarhøpi er talan um bundnar raðfestingar). Í hesum sambandi er eisini neyðugt at fáa lyklatøl, sum lættliga vísa, hvussu samanhangurin er, sum soleiðis eisini kann verða

brúkt í samskiftinum um møguligar fylgir av at broyta ætlanirnar. Sum heild kann sigast, at tørvur er á at fáa størri innlit, fyri at kunna skilja samanhangin í fíggjarligu viðurskiftunum hjá Fróðskaparsetrinum.

Tað er Stýrið fyri Fróðskaparsetrið, sum er hægsti myndugleiki á stovninum og sum hevur ábyrgd av virkseminum í síni heild – herundir eisini eini skynsamari fíggjarligari stýring. Fróðskaparsetrið er sambært lóg í armslongd frá landsstýriskvinnuni og Mentamálaráðnum. Men tað er Mentamálaráðið, sum fyrireikar politisku viðgerðina av fíggjarligu viðurskiftunum hjá Setrinum, eins og ráðið skal góðkenna útbúgvingar v.m. Skipanin, sum skal mennast, skal kunna brúkast í samskiftinum millum Stýrið fyri Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið um teir yvirskipaðu karmarnar fyri hetta virkisøki. Í fyrisitingarliga fyrireikingararbeiðinum kann sjálvandi verða samskift millum talsfólk í Mentamálaráðnum og Fróðskaparsetrinum, men formliga er týdningarmikið, at Stýrið tekur ábyrgd av tí, sum verður avtalað við politisku skipanina.

Tað er tí Stýrið fyri Fróðskaparsetrið og landsstýriskvinnan í mentamálum, sum í felag seta arbeiðið í gongd við at skipa eina betri búskettskipan og fíggjarliga stýring á Fróðskaparsetrinum.

**Arbeiðsbólkur**

Stýrið fyri Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið seta í felag ein arbeiðsbólk við umboðum frá Fróðskaparsetrinum, Mentamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Leif Abrahamsen verður settur sum ráðgevi og greinari.

**Setningur**

Arbeiðsbólkurin ger greiningar, niðurstøður og tilmæli um hesi viðurskifti:

1. Lýsing av virkseminum og fíggjarligu gongdini á Fróðskaparsetrinum síðani 2008. Møgulig samanbering við líknandi virksemi í grannalondum.

2. Lýsing av, hvør ítøkiligur leistur hevur verið nýttur í sambandi við búskettering og fíggjarligari stýring á Fróðskaparsetrinum higartil. Hvussu er ætlaða virksemið grundarlag undir búsketteringini. Hvussu er búsketteringin og fíggjarliga stýringin skipanarliga løgd til rættis við ábyrgdum v.m. Meting av, hvussu skipanin riggar, og hvat møguliga átti at verið broytt.

3. Hvussu kann ein skipan við einum búskaparligum myndli og lyklatølum v.m. gerast fyri samanhangin millum virksemi og búskaparligu nýtsluna á Setrinum. Hvørjir parametrar eiga at innganga, og hvørjar fortreytir eru fyri hesum. Her verður m.a. hugsað um 1) Tíð, sum hvørt starvsfólk brúkar til undirvísing, gransking og annað. 2) Undirvísingaravrik (ECTS), granskingaravrik v.m. Eisini kunnu tað verður onnur viðurskfiti.  Hvussu kann myndilin verða grundarlag fyri fleiri ára búskettum, sum eru grundað á objektiv kriteriir.

4. Hvussu kann munurin millum talið á lesandi á Fróðskaparsetrinum (uml. 1000) og talið á teimum, sum fáa útbúgvingarstuðul frá Studna (uml. 750) greinast. Lýsing av upptøku, fráfalli, lestraravriki, og hvussu haldgott eftirlit verður hildið við hesum.

5. Onnur viðurskifti av týdningi fyri at greina viðurskiftini á Fróðskaparsetri Føroya við atliti at fíggjarligu viðurskiftunum og sambandinum til politisku skipanina.

Ein frágreiðing verður latin landsstýriskvinnuni í mentamálum.

# Fylgiskjal 2 Ráðleggingarmyndil Setursins við dátum fyri 2017

| | | |
|---|---|---|
| Ársarbeiðstímatal | 1651 | |
| Faktor BA | 3 | |
| Faktor MA | 4 | |
| Faktor vegleiðing og próvdøming | 1 | |
| Starvsfólkaendamál | 10% | |
| Annað útbarb | 10% | |
| Ójavnvág | 0% | |
| Samlaður faktor BA | 4,89 | |
| Samlaður faktor MA | 6,11 | |
| Mánaðarløn vísindafólk | 41000 | 639600 |
| Mánaðarløn tøkni/admin | 26000 | 405600 |
| Pensión og onnur alm gjøld | 30% | |
| Overhead pr. starv | 0% | |

| | on/off | Undirvíst ECTS/ár | skeiðsstødd normerað | tal av skeiðum | vikur | t/viku | tímar/skeið | tímar/ects | Faktor | Tímar til útbúgving | vísinda-størv | undirvís-størv | Lutfall gransk-grund | | vektað tal av størvum | tillutað gransking | tillutað leiðsla o.a. | tillutaði stuðulsstørv | tils mió kr | roknaði ársverk | Kostnaður |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lærara Bed | 1 | 420 | 15 | 28 | 10 | 13 | 130 | 8,7 | **4,89** | 17.796 | 21,6 | 10,8 | 0,35 | 0,65 | 15,6 | 1,00 | 2,50 | 2,00 | 12.359.660 | 28,8 | 17.974.501 |
| Námsfrøði Bed | 1 | 285 | 15 | 19 | 10 | 13 | 130 | 8,7 | **4,89** | 12.076 | 14,6 | 7,3 | 0,2 | 0,80 | 8,8 | 0,00 | | | 5.614.841 | | |
| Føroyskt BA | 1 | 180 | 10 | 18 | 14 | 4 | 56 | 5,6 | **4,89** | 4.928 | 6,0 | 3,0 | 0,6 | 0,40 | 4,8 | 0,00 | 1,50 | 4,00 | 5.637.772 | 12,7 | 7.159.858 |
| Føroyskt MA | 0,75 | 120 | 10 | 12 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **6,11** | 2.310 | 2,8 | 1,4 | 0,7 | 0,30 | 2,4 | 0,00 | | | 1.522.085 | | |
| KT-verkfrøði | 0,75 | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 | **4,89** | 3.520 | 4,3 | 2,1 | 0,6 | 0,40 | 3,4 | 0,00 | 2,50 | 4,00 | 5.404.237 | 25,1 | 15.125.140 |
| Vistfrøði | 1 | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 | **4,89** | 4.693 | 5,7 | 2,8 | 0,6 | 0,40 | 4,6 | 0,00 | | | 2.910.450 | | |
| Havlívfrøði | 0,56 | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 | **4,89** | 2.628 | 3,2 | 1,6 | 0,6 | 0,40 | 2,5 | 0,00 | | | 1.629.852 | | |
| Mýlska lívfrøði | 0,56 | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 | **4,89** | 2.628 | 3,2 | 1,6 | 0,6 | 0,40 | 2,5 | 0,00 | | | 1.629.852 | | |
| Orkuverkfrøði | 1 | 90 | 7,5 | 12 | 8 | 10 | 80 | 10,7 | **4,89** | 4.693 | 5,7 | 2,8 | 0,6 | 0,40 | 4,6 | 0,00 | | | 2.910.450 | | |
| Støddfrøði | 0,33 | 60 | 7,5 | 8 | 8 | 10 | 80 | 10,7 | **4,89** | 1.033 | 1,3 | 0,6 | 0,6 | 0,40 | 1,0 | 0,00 | | | 640.299 | | |
| Sjúkrarøktarfrøði | 1 | 240 | 15 | 16 | 10 | 15 | 150 | 10,0 | **4,89** | 11.733 | 14,2 | 7,1 | 0,5 | 0,50 | 10,7 | 0,00 | 4,00 | 2,00 | 10.190.623 | 18,8 | 11.543.587 |
| Fólkaheilsa | 1 | 60 | 15 | 4 | 14 | 6 | 84 | 5,6 | **6,11** | 2.053 | 2,5 | 1,2 | 0,7 | 0,30 | 2,1 | 0,00 | | | 1.352.965 | | |
| Sosialvísindi | 1 | 180 | 10 | 18 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **4,89** | 3.696 | 4,5 | 2,2 | 0,6 | 0,40 | 3,6 | 0,00 | 5,00 | 2,00 | 6.301.179 | 27,7 | 17.250.366 |
| Politikkur og umsiting | 0,8 | 180 | 10 | 18 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **4,89** | 2.957 | 3,6 | 1,8 | 0,6 | 0,40 | 2,9 | 0,00 | | | 1.833.583 | | |
| Søga | 0,8 | 180 | 10 | 18 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **4,89** | 2.957 | 3,6 | 1,8 | 0,6 | 0,40 | 2,9 | 0,00 | | | 1.833.583 | | |
| Búskaparfrøði | 1 | 90 | 7,5 | 12 | 14 | 5 | 70 | 9,3 | **4,89** | 4.107 | 5,0 | 2,5 | 0,6 | 0,40 | 4,0 | 0,00 | | | 2.546.644 | | |
| Søga MA | 1 | 60 | 10 | 6 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **6,11** | 1.540 | 1,9 | 0,9 | 0,7 | 0,30 | 1,6 | 0,00 | | | 1.014.724 | | |
| Sosialvísindi MA | 0,5 | 60 | 10 | 6 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **6,11** | 770 | 0,9 | 0,5 | 0,7 | 0,30 | 0,8 | 0,00 | | | 507.362 | | |
| Politikk og umsiting MA | 0,5 | 60 | 10 | 6 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **6,11** | 770 | 0,9 | 0,5 | 0,7 | 0,30 | 0,8 | 0,00 | | | 507.362 | | |
| West Nordic Studies MA | 1 | 40 | 10 | 4 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **6,11** | 1.027 | 1,2 | 0,6 | 0,7 | 0,30 | 1,1 | 0,00 | | | 676.482 | | |
| Løgfrøði MA | 1 | 120 | 10 | 12 | 14 | 3 | 42 | 4,2 | **6,11** | 3.080 | 3,7 | 1,9 | 0,7 | 0,30 | 3,2 | 0,00 | | | 2.029.447 | | |
| | | ECTS | | skeið | | | | | | tímar til útb | | | | | vektað tal av størvum | | | | kostnaður | ársverk | |
| | | 2.785 | | 265 | | | 1.478 | | | 90.994 | 110 | 55 | | | 84 | | | | **69.053.453** | **113** | **69.053.453** |

Myndin omanfyri er av dømi um hvussu excelmyndilin kann brúkast til at modellera tímatørvin til útbúgvingarvirksemið. Høvuðsinputparametrarnir er hvørjar útbúgvingar koyra (undirvíst ECTS/ár), hvussu nógvir undirvísingartímar skeiðini á einstøku útbúgvingum hava fingið tillutað. Samlaða tímatalið verður so funnið við at rokna út hvussu nógv tíð krevst til fyrireiking av hvørjum undirvísingartíma, til vegleiðing og próvtøkur og til annað útbúgvingarvirksemi. Eisini er neyðugt at áseta hvat krevst av leiðslu og stuðuls størvum. Myndilin roknar út hvussu nógvir tímar er tørvur á, umframt at til ber at áseta eina vekting av hvussu nógv granskingarstørv eru ella eiga at vera á deildini og sum úrslit av hesum fáa eina meting av samlaða talið av størvum sum tørvur er á og eina meting av kostandinum – merkt við reyðum. G.g. at størv til sentralu fyrisitingareindirnar, til reingerð og til viðlíkahald er ikki við í hesum.

Fylgiskjal 3 Samskifti millum ráðið og Setrið um játtanina fyri 2017

| skjal# | | Dagur | Mán | ár | Hvør | Frágreiðing |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 9 | Febr | 16 | Mmr | Ynski um framskrivingar av virksemi |
| | 2 | 12 | Febr | 16 | Fs | svar 17 100 mio. og 18 110 mio |
| | 3 | 16 | Febr | 16 | Mmr | Útdjúpandi spurningar, hví er framskrivingin konstant 2018-2021 |
| | 4 | | | | | finni einki svar |
| | 5 | 27 | Mai | 16 | mmr | útmelding um fíggjarkarm, einki tal í hesi útmeldingini, men her verða serlig ynski, sum krevja játtan umrøtt og skal hetta krevja serliga frágreiðing |
| | 6 | 28 | Mai | 16 | fs-int | boð til hugin um at fara í gond beinanvegin.' |
| | 7 | 17 | Juni | 16 | fs-int | umrøður eitt skjal, sum byrjað skal við |
| | 8 | 6 | Juli | 16 | Fs | drúgv frágreiðing á øllum økjum, men nú er framskrivingin smb. við skjal 2 97.050 |
| 8a | | 6 | Juli | 17 | fs-int | FMR hevur nevnt fyri Sigurð møguleikan fyri fíggjarnevndarskjali, men Hugin avvísir hetta kategoriskt, tí eykajáttanartørvurin hevur ikki nakran akuttan karakter |
| | 9 | 23 | Sept | 16 | mmr | fráboðað verður, at í uppskoti til fíggjarlóg er talið nú eitt annað. Íroknað lønarframskrivingar. Vegleiðaraútb ikki boðin út |
| | 10 | 30 | | 16 | fs-int | Fer í gongd við interna búskettering í mun til karmin. Tað verður brúkt eitt ávíst rokniark, sum allar deildirnar skulu svara. Hetta røkkur meira ella minni heilt til ársskiftið |
| 10a | | 18 | Nov | 16 | Fs | Sigurð boðar frá, at uppskotið til játtan upp á 84,655 mio. kr ikki heldur, tað er brúk fyri 4 mio kr. afturat. |
| 10a | | 13 | Des | 16 | Fs | Sigur, at  nú hevur fíggjarnevndinlækkað uppskotið við 1 mio. kr. Heitir á MMR um at taka stig. |
| | 11 | 2 | Jan | 17 | fs-int | Í skrivi til dekanarnar, boðar rektarin frá, at játtanin heldur ikki til ætlaða virksemið, tí er neyðugt at finna sparingar. Biður um uppskot |
| | 12 | 2 | Jan | 17 | fs-int | Hugin svarar upp á uppskotið, sum sær út til at vera liðað á deildir, at hann má hyggja nærri eftir teimum einkultu postunum í internabúskettinum, sum sær út til at vera 84 mio. |
| | 13 | 23 | Febr | 17 | Fs | Játtanin er 1,6 mio. kr. ov lág í mun til verandi virksemi. |
| | 14 | 8 | Mars | 17 | Fs | FS minnir MMR á skrivið frá 23. febr. Nú verður ein nýggjur spurningur introduseraður, nevniliga meirútreiðslur fyri broyttan lønarstiga, kr. 900 tús. vísir eisini á framskrivingar. |
| | 15 | 22 | Mars | 17 | Fs | Støðan álvarslig, tí undrar rektarin seg yvir einki svar. |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 16 | 20 | Juni | 17 | fundarfr | Sera álvarsligur fundur og uppáhald. Setrið sigur at MMR ikki lurtar og MMR sigur at tað vanta neyðugar grundgevingar fyri játtanini Setrið biður um. MMR staðfestir enn einaferð, at játtanin skal halda osv. Her verður tosað um 900 tús, sum er lønarhækkanir og 700 túsund til starvslæru og leysar lønir |
| 16 b | | 20 | Juni | 17 | fs | Kunnar mmr um fundin við fíggjarnevndina. Sigurd sigur, at hann kunnaði um at játtanin var ov lítil, og tí er neyðugt at seta sparingar í verk, sum sannlíkt koma at rakkar útbúgvingarvirksemið |
| 16a | | 21 | Juni | 17 | fs | Vísur til skrivið 8. mars + sigur seg ynskja tættari samskifti við MMR. Nú verður eitt annað tal nevnt - nevniliga uttan lønarframskrivingar |
| 18aa | | 29 | Juni | 17 | fs | Sigurd sigur frá, hvørji sparitiltøk kunnu fremjast og hvørjar avleiðingar hetta fær. Talan er um eina mio. kr. + eitt sindur afturat. |
| 18aa | | 4 | Juli | 17 | mmr | Mortan boðar frá, at hann ikki veit meira um málið í fíggjarnevndini. |
| 18ab | | 5 | Juli | 17 | fs-int | Hol verður sett á ætlaðu sparingarnar |
| 18ac | | 7 | Juli | 17 | fs | argumenterað verður fyri eykajáttanini nú |
| 18a | | 9 | Aug | | | |
| 18b | | 15 | Aug | 17 | mmr | Boðar fs frá, at 900 tús liggja í tinginum. |
| | 19 | 15 | Aug | 17 | fs | Hugin umrøður uppskot til eykajattan, sum datt burtur, tí nýtt tingár byrjaði. Umrøður 2,5 mio.kr. Sigur at tingið er positivt fyri teim 900 tús. Eykajáttanin varð samtykt í august. Tað er framhaldandi tørvur á teim 1,6 afturat. |
| 19a | | 15 | Aug | 17 | fs-int | Drúgt upprit til sparingar sent deildarleiðarunum |
| | 20 | 14 | aug | 17 | | Her verður samskift aftur og fram um eykajáttanina |
| | 21 | 16 | Aug | 17 | fs | Hugin grundgevur fyri, eini eykajáttan upp á 1,6 mio. kr. orsakað av øktum rakstri. |
| | 22 | 15 | Sept | 17 | mmr | Landsstýriskvinnan spyr hví Setrið júst valdi ískoytisútbúgving fyri sjúkrarøktarfrøð, tí hon rakti 40 fólk. Hon undirstrikar, at Setrið hevur fingið hækkað játtanina undir hennnara skeiðið við 10 mió kr. |
| | 22 | 21 | Sept | 17 | fs | Setrið kemur við eini frágreiðing, hví ískoytisútbúgvingin ikki varð boðin út. |

Fylgiskjal 4 Arbeiði við Fíggjarlóg í Mentamálaráðnum

Játtanarskipanin ásetur, at landstýriskvinnan í fíggjarmálum áðrenn 1. apríl skal leggja fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um yvirskipaðu játtanarkarmarnar. Fíggjarmálaráðið sendir út eina tíðarætlan fyri arbeiðið við játtanarkørmum. Umframt búskaparfrágreiðingina, sum Búskaparráðið ger, er grundarlagið undir játtanarkørmunum framskrivingar av lógarbundnum játtanum, bundnum raðfestingum og løgum, sum Mentamálaráðið skal lata Fíggjarmálaráðnum.

Arbeiðið við játtanarkørmum tekur støði í verandi virksemi á stovnunum og fíggjar- og virksemisætlanum fyri verandi ár. Virksemið verður framskrivað, og metingar verða gjørdar um meir- og minnivirksemi, tá ið nýtt lestrarár byrjar í august. Hugt verður eisini eftir roknskapartølum fyri undanfarna árið, so fyrilit verða tikin fyri møgulium broytingum, sum hava verið, og lønarnýtslan verður framroknað. Mentamálaráðið samskiftir við stovnarnar um nýtslu og framskrivingar av virkseminum.

Tá farið verður undir fíggjarlógina, sendir sendir Mentamálaráðið í mai mánaði stovnum umbøn um fíggjar- og virksemisætlan fyri komandi ár. Fíggjar- og virksemisætlanirnar taka støði í til- og frágongd av næmingum og lesandi. Tá ið Mentamálaráðið hevur móttikið ætlanirnar í juni, verður farið undir ítøkiliga viðgerð. Stovnsleiðarar verða kallaðir inn til fundar eftir tørvi at umrøða virksemi og møguligar raðfestingar og nýskipanir. Hetta arbeiðið heldur vanliga fram inn í heystið. Men longu í juni skal Mentamálaráðið lata Fíggjarmálaráðnum frágreiðing um tiltøk, sum tryggja, at nýskipanir og raðfestingar verða hildnar innan fyri samtykta játtanarkarmin. Í august verður so farið undir politiska viðgerð eftir ráðlagdari tíðarætlan frá Fíggjarmálaráðnum.

Samtykti játtanarkarmurin er avgerandi fyri, hvussu nógv fíggjarligt rásarúm Mentamálaráðið hevur at arbeiða við. Í hesum sambandi er viðkomandi at nevna, at Fróðskaparsetrið hevur ikki júst somu fortreytir sum fólkaskúlin og gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, tí hesar hava ávikavist lógarásetta undirvísingarskyldu og lógarásetta skyldu til at taka allar skikkaðar næmingar inn. Av tí at Fróðskaparsetrið ikki hevur skyldu til at taka allar skikkaðar umsøkjarar inn á útbúgvingarnar, verður tað vanliga roknað sum ein raðfesting, um til- og frágongdin hevur við sær, at fleiri bólkar ella flokkar kunnu setast á stovn.

Fróðskaparsetrið undantikið, hava flest allar útbúgvingar eitt hampiliga støðugt virksemi við til- og frágongd ár undan ári, og tá er meginreglan um at fíggja nýskipanir og raðfestingar innanfyri samlaða játtanarkarmin ein skilagóður máti at tálma útreiðsluvøkstrinum. Fróðskaparsetrið hevur seinastu árini verið í støðugun vøkstri, og tá kann tað koma tvørt fyri, um tiltøk aðrastaðni á § 7 ikki á hvørjum ári kunnu fíggja vøksturin.

Í 2014 legði Fróðskaparsetrið fram eitt strategiskjal, ið setur karmar fyri menningina av úrbúgvingarvirkseminum fram til 2024. Eitt av høvusmálunum er at bjóða fleiri granskingargrundaðar útbúgvingar á altjóða stigi til ein breiðan skara, so fleiri fáa møguleikan at nema sær hægri útbúgving. Ítøkiliga málið er at hava í minsta lagi 1.500 lesandi í 2024. Millum stýrið og rektara bleiv gjørdur avrikssáttmáli, sum setti sum mál, at í tíðarskeiðinum 2013-2018 skuldu 19 nýggjar útbúgvingar setast á stovn.

Tað er ein sannroynd, at ársmeginreglan í stýrisskipanini og játtanarskipanini og politiska skipanin annars í ov lítlan mun taka atlit at veruleikanum hjá útbúgvingarstovnum. Verða framskrivingar gjørdar, eru ofta talan um tekniskar framskrivingar, sum ikki hava kjølfesti í einari politiskari ætlan. Tí koma bæði strategiskar ætlanir og framskrivingar ofta at hanga í leysari luft. Umráðandi er eisini, at politiskar ætlanir og framskrivingar verða fataðar sum bindandi.

Fróðskaparsetrið hevur skorað á fyri at røkka málunum mótvegis stýrinum, og tað er í sjálvum sær vert at geva gætur, men givið er, at ein stovnur eigur at virða týdningin av, at fíggjarlógin verður samtykt sum lóg, og at tiltøk í nóg góðari tíð verða sett í verk, sum kunnu tryggja, at játtanin heldur.

Fyri at bøta um øll hesi viðurskifti, hava royndir verið gjørdar at styrkja samskiftið millum Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið. Eins og ásett varð í roknskaparkunngerðini fóru Mentamálaráðið og Fróðskaparsetrið í 2015 undir at gera avrikssáttmála, sum kundi tryggja, betri samsvar millum politisku ætlanina og virksemisætlanina á Fróðskaparsetrinum. Mentamálaráðið og Fróðskaparsetrið vóru komin á mál við hesum arbeiðinum, tá ásetingin um mál og avrik bleiv tikin úr kunngerðini. Einki spurdist tí víðari burturúr hesum arbeiðinum.

**Betri innlit í virksemið**

Í 2013 vóru bygnaðarbroytingar framdar í Mentamálaráðnum. Mentamálaráðið fekk eina politikkfyrireikandi umsiting øðrumegin og fíggjarliga umsiting hinumegin. Fíggjarliga umsitingin bleiv savnað í einari nýggjari deild, Stýrisdeildin, hvørs aðalmál varð at tryggja eina skynsama gagnnýtslu av øllum tilfeingi innanfyri málsøkið hjá Mentamálaráðnum.

Fyrimunurin við nýggja bygnaðinum í Mentamálaráðnum er, at uppgávur og førleikar eru betri sjóðaðar saman, og á tann hátt hevur tað styrkt um fakligu umsitingina. Ein styrkt fíggjarumsiting hevur eisini havt við sær, at krøvini um innlit í virksemi og rakstur á stovnunum eru vorðin herd.

Vansin við nýggja bygnaðinum er, at Fróðskaparsetrið nú hevur fleiri móttakarar at venda sær til í Mentamálaráðnum. Snýr tað seg um innihaldsliga partin av útbúgving og gransking, skal Fróðskaparsetrið venda sær til Mentanardeildina. Snýr tað seg um virksemið og fígging, skal tað venda sær til Stýrisdeildina. Soleiðis er tað ikki altíð púra greitt, hvaðar Fróðskaparsetrið skal venda sær, tí sjáldan eru mál annaðhvørt hetta ella hatta. Tað kann tí koma fyri, at ein deild ikki er nóg væl við í einari tilgongd ella avgerð. Hóast tað krevur tíð at arbeiða saman um mál, er neyvan ivi um, at betri samskipan hevði økt um dygdina í arbeiðinum, og soleiðis varð eisini tann tíðin vunnin aftur, sum arbeiðið tók.

Áðrenn bygnaðarbroytingarnar í Mentamálaráðnum vóru framdar, lógu bæði tann politikkfyrireikandi og fíggjarliga umsitingin úti á avvarðandi deildum, og tað var ymiskt, hvussu fíggjarligu viðurskiftini hjá stovnunum vóru handfarin. Mong viðurskifti kunnu hava havt týdning fyri, at Mentamálaráðið ikki hevur havt sama innlit í útbúgvingarvirksemið á Fróðskaparsetrinum, sum á øðrum stovnum, men tað hevur uttan iva havt týdning, at Fróðskaparsetrið upprunaliga hevur verið ein sjálvsognarstovnur. Sambært upprunaligu seturslógini hevði stovnurin eins og í dag sjálvsavgerðarrættindi viðvíkjandi gransking, men tá tað snúi seg um fíggjarlig viðurskifti, vóru

ymiskar fatanir av, í hvønn mun Mentamálaráðið kundi tilskila sær til innlit í útbúgvingarvirksemið á Fróðskaparsetrinum. Við løgtingslógini frá 2012 vóru stovnsviðurskiftini broytt, og Fróðskaparsetrið bleiv ein almennur stovnur.

Fyri at hava grundarlag at meta um fíggjartørvin á einum útbúgvingarstovni, er neyðugt at síggja sambandið millum útbúgvingarvirksemið og fíggjarjáttan. Hetta innlitið er somuleiðis ein fortreyt fyri at kunna gera virksemisyvirlitini til fíggjarlógina. Her verða virksemisyvirlitini fyri útbúgvingarstovnarnar lutað sundur í trý: høvuðsendamál, virksemi og eindarkostnaður. Mælt verður til at nýta henda leistin:

A: Høvuðsendamál (1.000 kr.)

Høvuðsendamál lýsir virksemið í krónum. Skilt verður ímillum undirvísingarvirksemi øðrumegin og fyrisiting og leiðslu hinumegin. Høvuðsuppgávan á Setrinum er sambært lógini at ”inna gransking og veita frálæru”. Viðkomandi er tí, at hetta virksemið verður lýst í fíggjarlógini:

1) Fyrisiting og leiðsla
2) Undirvísing
3) Gransking

B: Virksemi (tal)

Virksemi lýsir talið á lesandi í mun til kostnað, og um hetta skal verða nóg upplýsandi, er neyðugt í hvussu er at greina virksemið út á deildir:

a. Føroyamálsdeildin
b. Námsvísindadeildin
c. Náttúruvísindadeildin
d. Sjúkrarøktarfrøðideildin
e. Søgu- og samfelagsdeildin

C: Eindarkostnaður (kr.):

Her verður lutfallið millum høvuðsendamál (kr.) og virksemi (tal) greinað, og sami leistur kann brúkast:

1) Fyrisiting og leiðsla (kostnaður fyri hvønn lesandi)
2) Undirvísing (kostnaður fyri hvønn lesandi)
3) Kostnaður fyri hvønn lesandi til samans

**Samanumtøka og tilmæli**

Ársmeginreglan í stýris- og játtanarskipanini virkar í dag avmarkandi fyri arbeiðið við raðfestingum og nýskipanum. Tá ið játtanarkarmar verða lagdir, hevur tað avgerðandi týdning at langskygdar ætlanir hava politiskt kjølfesti, og at framskrivingar í størri mun eru bindandi.

Fyri at hetta skal bera til, er neyðugt øðrumegin at styrkja um samskiftið millum Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið um strategisku ætlanirnar, og hinumegin at hetta arbeiðið verður betri samskipað við fíggjarlógararbeiðið inni í ráðnum. Ein fortreyt fyri hesum er, at Fróðskaparsetrið og Mentamálaráðið hava eitt amboð, sum gevur eina felags fatan av sambandinum millum útbúgvingar- og granskingarvirksemið og játtan.

Fíggjarlógin er bæði eitt politiskt og eitt alment skjal. Tí hevur tað bæði politiskan og almennan áhuga, at virksemið á Fróðskaparsetrinum verður lýst eftir sama leisti sum hjá øðrum útbúgvingarstovnum.

Fylgiskjal 5  Uppskot til normering av undirvísingararbeiði á Fróðskaparsetri Føroya

**Endamál:**
Tørvur er á at skipa og áseta tíðarnýtsluna fyri undirvísingaruppgávur neyvari og á tann hátt at geva starvsfólkum og leiðslu eitt betur amboð til at leggja útbúgvingarvirksemið til rættis. Umframt at slíkt amboð hevur týdning í mun til fíggjarstýring – so er eisini eitt endamál at skapa greidleika, gjøgnumskygni og rættvísi, um hvussu arbeiðsuppgávur verða býttar. Tá útbúgvingar- og undirvísingararbeiðið er neyvari avtalað og skjalfest – so verða umstøðurnar at leggja granskingararbeiðið til rættis greiðari.
**Royndartíðarskeið**
Skipanin verður sett í verk við byrjan av lestrarárinum 2017/2018, og skal hon eftirmetast og tillagast regluliga.
**Gransking og undirvísing:**
Vísindastarvsfólk hava tvær høvuðsuppgávur – tær eru at granska og undirvísa. Flestu vísindastarvsfólk hava tó eisini uppgávur av fyrisitingarligum slag og tí stingur spurningurin seg upp, um hesar skulu flokkast fyri seg ella sum partur av undirvísing ella gransking. Í hesum uppskotinum verða fyrisitingarligar uppgávur tongdar at útbúgving roknaðar sum undirvísingartíð. Granskingartíðin verður ikki viðgjørd her.
**Meginásetingar:**
Arbeiðsárið (ársnormurin) er 1651 tímar
Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25 (á jóansøku) (=44 vikur)
Undirvíst verður í 30 vikur í lestrarárinum umframt próvtøkur
Allar arbeiðsuppgávur skulu roknast inn í ársnormin (eyka samsýning verður ikki givin uttan í serligum førum og tá tað er frammanundan avtalað)
Føst vísindalig granskingar- og undirvísingarstørv eru professari, lektari og námslektari. Tíðaravmarkaði vísinda- og útbúgvingarstørv eru adjunktur, ph.d.-lesandi og post.doc.
Hjá professarum og lektarum er hálvur ársnormur settur av til gransking og hálvur ársnormur til undirvísing.
Námslektari er fulltíðar undirvísingarstarv. Eftir avtalu við dekanin verður ávísur partur av ársnorminum settur av til fakliga menning og somuleiðis kann tíð setast av til gransking.
Fyri adjunkt, post.doc og ph.d. størv verður avtala gjørd í hvørjum einstøkum føri um undirvísing.

**Undirvísingar- og útbúgvingararbeiði:**
Uppgávurnar kunnu býtast í tríggjar partar – 1) tær sum hava beinleiðis við undirvísingina at gera, 2) tær sum snúgva seg um fyrisiting av útbúgving og planlegging av útbúgvingarvirksemi og 3) aðrar uppgávur.
Fyri beinleiðis undirvísingararbeiði verður roknaður ein sonevndur "faktor", sum faldaður við undirvísingartímatalið (skemaløgd undirvísing) gevur samlaðu normeringina (tímatalið) til ávísa skeiðið.
Faktortímarnir skulu brúkast til at fyrireika og kvalitetstryggja undirvísingina.
Sum meginregla verður settur ein faktor 3 fyri skeið á bachelorstigi og faktor 4 fyri skeið á masterstigi. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi kann dekanur áseta hægri faktortal.
Fyri undirvísingar- og útbúgvingararbeiði annars verður ikki latin fyrireikingartíð, men ístaðin ásett normeringar fyri ymsu uppgávurnar.
Tað er ymiskt hvussu deildirnar leggja undirvísingina til rættis og í hvønn mun lesandi fáa vegleiðing einsæris ella í smærri bólkum. Fyri at hetta framhaldandi skal vera møguligt, so verður lagt upp til, at at 10 tímar + 0,15t pr lesandi pr ects verða settir av til endamálið. Hesir tímarnir kunnu so brúkast t.d. til vegleiðing, til fyrireiking, projektarbeiði ella annað.

**1) Undirvísing:**

- Konfrontatiónstímar (roknað sum 60 minuttir tímar?)
- Fyrireika undirvísing (fakligt og pedagogiskt)
- Tryggja at undirvísingin er grundað á gransking og á nýggja vitan
- Eftirmeting av undirvísing og úrtøku
- Endurskoða skeiðslýsingar

Faktor

- • 3 fyri bachelor (1+2)
- • 4 fyri master (1+3)

**2) Uppgávur sum snúgva seg um fyrisiting av útbúgving og planlegging av útbúgvingarvirksemi:**

- Vegleiðing
- Gerð av nýggjum skeiðslýsingum/námsskipanum
- Munnlig próvtøka: próvtøkufyrireiking og døming
- Skrivlig próvtøka: ger av próvtøkusettum og próvdøming
- Leiðbeining og døming av bachelorritgerðum
- Leiðbeining og døming av masterritgerðum,
- Leiðbeining av ph.d.-verkætlanum
- Leiðbeining av øðrum uppgávum
- Útbúgvingarleiðsla - tímatal eftir nærri avtalu –
- Lestrarráðsformaður/kvinna tímatal eftir nærri avtalu
- At vera ábyrgdarlærari/toymisleiðari fyri skeið og útbúgvingareindir – tímatal eftir nærri avtalu

**3) Aðrar uppgávur**

• Deildarfundir
• Fakligir fundir
• Luttøka í samstarvsnetverkum (t.d. norðurlendskt útbúgvingarsamstarv)
• Limur í Akademiska ráðnum
• Limur í Samstarvsnevndini
• Aðrar uppgávur eftir avtalu við leiðara (dekan)
• Nevndararbeiði
• Annað (skeiðsvirksemi, menning, netverk, verkætlanir etc.)

| **Tímaásetingar: Normering av uppgávum** | **Viðmerking** | t |
|---|---|---|
| Bachelorritgerðir (15 ECTS) – leiðbeining og døming | 15t/ritgerð | 15 |
| Bachelorritgerðir (22,5 ECTS) – leiðbeining og døming | 22,5t/ritgerð | 22,5 |
| Masterritgerðir (30 ECTS) – leiðbeining og døming | 30t/ritgerð | 30 |
| Masterritgerðir (60 ECTS) | 50/ritgerð | 50 |
| Ph.d. ritgerðir | 80t/ár/ph.d. lesandi | 80 |
| Tal av lesandi - 0,15t*tal av lesandi/ects | 15 les*0,15t*10ects | 22,5 |
| Próvtøkur fyrireiking – ger av uppgávum etc | 30 t/skeið | 30 |
| Próvdøming skeið (A) | 30 min/uppgávu | 0,5 |
| Próvdøming skeið (B) | 60 min/uppgávu | 1,0 |
| Deildarfundir/annað útb-fundarvirksemi | 16 fundir*1,5t | 24 |
| Limur í lestrarráði | 8 fundir*3t*1,5 | 36 |
| Útbúgvingarleiðari – eftir avtalu við dekanin | ½-1 ársnorm undirvísing | 425 - 851 |
| Lestrarráðsformaður/forkvinna | 8 fundir*3t*4,5 | 108 |
| Fakligur lestrarvegleiðari | 2 t/viku*30 vikur | 60 |
| Samskipan starvsvenjing/klinikk | | |
| Limur í Akademiska ráðnum | 4 fundir*2t*2 | 16 |
| Limur í Samstarvsnevndini | 4 fundir*2t*1,5 | 12 |
| Menning av nýggjum skeiði/tillagingar til námsskipan | 2 vikur | 70 |
| Eyka fyrireiking av undirvísing sambært avtalu | | |
| Eftirmeting pr skeið | 1 dagur | 7 |
| Ábyrgdarlærari/toymisábyrgd pr skeið | 3 dagar | 21 |